FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

# Álit um
# landsstovnar og -grunnar

**Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti**

**November 2001**

## Innihaldsyvirlit


**1. Inngangur og formlig viðurskifti** *

*Inngangur* *
*Arbeiðssetningur* *
*Onnur viðurskifti viðvíkjandi grunnum* *
*Ummæli* *

**2. Samandráttur og niðurstøður** *

**3. Landsgrunnar** *

*Landsgrunnar í søguligum baksýni* *

**4. Tilknýti til fíggjarlóg** *

*Galdandi lóggáva* *
*Fyrilit aftanfyri ásetingarnar um fíggjarvald løgtingsins* *
*Siðvenja* *
*Danska fíggjarnevndin* *
*Almennir stovnar/grunnar* *
*Praksis viðvíkjandi grunnum í Føroyum* *
*Góðkenning av landsroknskapinum v.m.* *
*Delegatión* *
*Landsstovnar og –grunnar, sjálvsognarstovnar og sjálvstøðug fyrisitingarsubjekt* *
*Niðurstøða* *

**5. Tilknýti til landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti** *

*Galdandi lóggáva* *
*Eftirlit við landsvirksemi* *
*Niðurstøða* *

**6. Landsstovnar, landsgrunnar og grunnar** *

Húsalánsgrunnurin *
Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin *
Íbúðagrunnurin *
Apoteksgrunnurin *
Sjálvsognarstovnurin Sambýlir *



Traðagøta 39 • Postsmoga 2039 • FO-165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

Føroya Realkreditstovnur *
Fíggingargrunnurin frá 1992 *
Landsbanki Føroya *
Íleggingargrunnurin *
Føroyagrunnurin frá 1971 *
Forskotsgrunnur Fiskiflotans *
Búagrunnurin *
Kommunali láns- og veðhaldsgrunnurin *
Happadráttargrunnurin *
Orðabókagrunnurin *
Mentanargrunnur Landsins *
Grunnurin Kirkjubømúrurin *
Fróðskaparsetur Føroya *
Granskingargrunnurin *
Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar *
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin *
Frítíðargrunnurin *
Arbeiðsloysistryggingin *
Framtakgrunnurin *
Vinnuframagrunnurin *
Jarðargrunnurin *
Grunnur fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu *
Jólamerkjagrunnurin *

## 1. Inngangur og formlig viðurskifti

### *Inngangur*

**1.** Stýrisskipanarlógin og løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald áseta, at alt virksemið hjá landsstýrinum og hjá øllum landsstovnum skal játtast á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, og at gerast skal ein samlaður landsroknskapur, sum fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins umframt aktiv og passiv.

Virksemið hjá fleiri landsstovnum og landsgrunnum, sum landskassin á ein ella annan hátt varðar av, er ikki tikið við í løgtingsfíggjarlóg og er tí heldur ikki við í landsroknskapinum. Ogn og skuld hjá hesum landsstovnum ella landsgrunnum eru heldur ikki skrásett í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum. Løgtingsgrannskoðararnir og landsgrannskoðanin hava sett spurnartekin við, um hetta er í tráð við stýrisskipanarlógina.

Sambært stýrisskipanarlógini skulu løgtingsgrannskoðararnir, umframt árliga landsroknskapin, eisini fara ígjøgnum roknskapin hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap. Landsstýrinum er álagt at leggja hesar roknskapir fyri tingið til kunningar og at lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar at fara ígjøgnum og leggja fyri tingið til samtyktar. Tað er tó eingin greið lýsing av, hvørjir hesir almennu stovnar, sum hava sjálvstøðugan roknskap, eru.

### *Arbeiðssetningur*

**2.** Løgmaður vendi sær í 1998 til formansskap løgtingsins og til løgtingsgrannskoðararnar fyri at

fáa staðfest, hvørjir "stovnar við sjálvstøðugum roknskapi" talan er um í stýrisskipanarlógini § 45, stk. 4.

Í 1999 boðaði løgmaður frá, at hann fór at taka stig til at seta ein arbeiðsbólk at gjøgnumganga viðurskiftini hjá stovnum og grunnum, sum ikki eru við í fíggjarlóg og landsroknskapi. Hann vendi sær í hesum sambandi til landsstýrismannin í fíggjarmálum, sum saman við løgmanni gjørdi av at biðja fólk í umsitingini gera arbeiðið. Fíggjarmálastýrið fekk síðani ábyrgdina at fáa arbeiðið gjørt.

Eisini aðalstýrini hava víst á, at tað er av alstórum týdningi sum skjótast at fáa fulla greiði á ognarrætti og tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap annars, bæði viðvíkjandi umsitingarútreiðslum og fíggjarligum virksemi hjá fleiri stovnum og grunnum.

Endamálið við hesum áliti er at fáa greiði á hesum viðurskiftum. Mett verður um, hvussu tilknýti hjá landsgrunnum og landsstovnum skal vera til løgtingsfíggjarlóg og landsroknskap, herundir hvørjar roknskapir landsstýrið skal lata løgtinginum, og sum løgtingsgrannskoðararnir síðani skulu fara ígjøgnum og leggja fyri tingið til samtyktar.

Nakrir grunnar verða ikki viðgjørdir, antin tí at teir hava einki tilknýti til landskassan, ella tí, at játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti fylgja galdandi lógum. Nakrir verða tó tiknir við, hetta fyri at vísa skilnaðin millum landsgrunnar og privatar grunnar. Aðrir stovnar verða ikki viðgjørdir, tí hesir ikki koma undir arbeiðssetningin. Sum dømi kann nevnast landsfyritøkurnar, almenn partafeløg og sjúkrakassarnir.

### *Onnur viðurskifti viðvíkjandi grunnum*

**3.** Hóast arbeiðssetningurin er avmarkaður til omanfyri nevndu evni, so eru onnur viðurskifti viðvíkjandi landsgrunnum, sum eiga at verða endurskoðað. Niðanfyri verða nøkur av hesum viðurskiftum umrødd.

#### *Fíggjarlig høvuðsfyrilit aftanfyri at hava grunnar*

Eitt av høvuðsfyrilitinum aftanfyri at hava grunnar tykist vera ásetingin í játtanarskipanini um, at ein játtan er ein heimild at ráða í tí fíggjarári, sum játtanin er givin fyri. Tað kann í nøkrum førum vera ein trupulleiki, at játtanin í einum fíggjarári bert er ein partur av kostnaðinum fyri størri verkætlan, sum gongur yvir fleiri fíggjarár, tí heimildin at brúka játtaðu upphæddina fellur burtur, tá fíggjarárið er farið. Fyri at loysa játtanartrupulleikan í sambandi við slíkar verkætlanir eru grunnar settir á stovn. Hesir kunnu so spara árligu játtanina saman yvir fleiri ár.

Tá talan er um at veita stuðul, serstakliga til ítøkiligar verkætlanir, veita lán v.m. verður játtanarslagið "onnur játtan" nýtt. Í tílíkum førum er ofta neyðugt at játta stuðul í einum fíggjarári, sum ikki verður útgoldin fyrrenn í einum komandi fíggjarári. Hetta er ein trupulleiki í verandi játtanarskipan. Loysnin í tílíkum føri er oftani, at grunnar verða settir á stovn, soleiðis at løgtingið fær onga ella bert avmarkaða ávirkan á fíggjarliga virksemið.

Ein játtanarskipan kann gerast so stirvin, at løgtingið sjálvt finnir loysnir fyri at loysa trupulleikan. Avleiðingin í hesum føri er, at játtanarskipanin, ið er eitt týðandi amboð hjá løgtinginum, er vorðin so stirvin, at stýringin, ávirkanin og raðfestingin hjá løgtinginum verður munandi skerd.

#### *Óhefti grunnana*

Ein onnur grundgeving fyri at hava grunnar er, at ein ella onnur landsuppgáva best verður røkt, um

landsstýrið ikki hevur beinleiðis ávirkan. Landsstýrið nýtist tó ikki at hava stórvegis ávirkan á virksemið, hóast árliga játtanin verður samtykt í løgtinginum. Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður eru dømir um stovnar, sum eru við á løgtingsfíggjarlógini, og sum við lóg eru gjørdir óheftir av politiska myndugleikanum.

- "Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum."
- "Landsgrannskoðarin er óheftur í virki sínum"

Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya eru eisini dømir um, at virksemi hjá landsstovnum kann verða óheft av løgtingi og landsstýri, hóast teir verða tiknir við á fíggjarlóg.

- Sjónvarp Føroya er ein sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Sjónvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og veita eitt fjøltátta tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.
- Útvarp Føroya er ein sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Útvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsið, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltátta tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

Tað er sostatt gjørligt at hava stovnar, sum í dagliga virksemi sínum eru óheftir av bæði løgtingi og landsstýri, hóast hesir eru við í fíggjarlóg og landsroknskapi.

*Ábyrgd*

Tað hevur týdning, at tað er løgfrøðiliga greitt, hvør hevur endaligu ábyrgdina av landsgrunnum. Í fleiri førum kann ivi vera um, hvør hevur ábyrgdina, og um landskassin heftir fyri grunnunum.

*Endamál og tilverugrundarlag*

Tað er ikki óhugsandi, at tíðin er farin frá endamálinum hjá fleiri grunnum, sum tí einki tilverugrundarlag hava longur. Endamálið hjá øllum landsgrunnum eigur tí at verða endurskoðað.

***Ummæli***

**4.** Álitið er skrivað av Fíggjarmálastýrinum, og niðanfyri nevndu stovnar, aðalstýri og grunnar hava havt álitið til ummælis, áðrenn tað varð gjørt liðugt:

Løgmansskrivstovan, Fiskimálastýrið, Almanna- og heilsumálastýrið, Mentamálastýrið, Vinnumálastýrið, Oljumálastýrið, Landsgrannskoðanin, Løgtingsskrivstovan, Húsalánsgrunnurin, Forskotsgrunnur fiskiflotans, Búargrunnurin, Kommunali láni- og veðhaldsgrunnurin, Vinnuframagrunnurin, Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Arbeiðsloysistryggingin, Grunnurin fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu, Jarðargrunnurin, Framtaksgrunnurin, Landsbanki Føroya, Fíggingargrunnurin frá 1992, Føroyagrunnurin, Føroya Realkreditstovnur, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar og Mentanargrunnur Landsins.

Fíggjarmálastýrið hevur fingið viðmerkingar frá:

Løgmansskrivstovuni, Fiskimálastýrinum, Oljumálastýrinum, Landsgrannskoðanini, Húsalánsgrunninum, Vinnuframagrunninum, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, Arbeiðsloysistryggingini, Føroya Jarðarráð, Landsbanka Føroya, Fíggingargrunninum frá 1992, Føroya Realkreditstovni, Íleggingargrunninum fyri Føroyar og Mentanargrunni Landsins.

Fíggjarmálastýrið hevur viðgjørt innkomnu viðmerkingarnar gjølla, áðrenn álitið varð gjørt liðugt.

## 2. Samandráttur og niðurstøður

**1.** Síðst í 1980-árunum varð ein stórur partur av virksemi landsins stýrt umvegis landsgrunnar. Landsroknskapur og fíggjarlóg góvu lítið yvirlit yvir búskaparliga virksemi landsins, og búskaparstýringin var hareftir. Grein 19-nevndin, sum løgtingið setti at kanna, hvør orsøkin var til álvarsligu búskaparkreppuna fyrst í 1990-árunum, er sannførd um, at skipanin við nógvu landsgrunnunum var ein orsøk til, at politikarar og landsumsitingin mistu tamarhaldið á útreiðslum og gjaldføri landskassans í 1980-árunum, serliga seinast í 1980-árunum.

Høvuðstrupulleikin við landsgrunnum er, at løgtingið og landsstýrið ikki hava fult yvirlit yvir og stýring av búskaparliga virksemi landsins, tá virksemið hjá hesum ikki verður tikið við á fíggjarlóg og í landsroknskapin. Seinastu árini er eitt miðvíst arbeiði gjørt fyri at savna alt búskaparliga virksemi landsins í løgtingsfíggjarlóg og landsroknskap, men fleiri landsstovnar og -grunnar liggja framvegis uttanfyri. Talvan niðanfyri vísir fíggjarstøðuna hjá nøkrum av størstu landsgrunnunum og –stovnunum, sum í dag hvørki verða tiknir við í fíggjarlóg ella landsroknskap. Av hesum stovnum/grunnum er tað bert roknskapurin fyri Jarðargrunnin, ið verður lagdur fyri løgtingið.

| **Grunnur/Stovnur** | **Fíggjarstøða 1999** |
|---|---:|
| Arbeiðsloysisskipanin | 225.541.600 kr. |
| Húsalánsgrunnurin | 348.207.551 kr. |
| Landsbankin | 1.881.971.757 kr. |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin | 229.990.035 kr. |
| Jarðargrunnurin | 157.439.328 kr. |
| Realurin | 598.502.856 kr. |
| **Í alt** | **3.441.653.127 kr.** |

**2.** Í stýrisskipanarlógini er ásett, at eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Harumframt er ásett, at eingin skattur má verða kravdur

inn, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi. Neyðugt er sostatt, bæði at hava materiella heimild í løgtingslóg og fíggjarliga heimild í fíggjarlóg, áðrenn skattir kunnu krevjast inn. Her er talan um bindandi stjórnarrættarligar ásetingar, ið ikki loyva undantøkum.

Stýrisskipanarlógin ásetir, at eingin útreiðsla má verða goldin, uttan heimild er fyri henni í galdandi fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, sum er galdandi, tá ávíst verður. Undantøk kunnu gerast frá hesi áseting, um heimildin at halda útreiðslur verður delegerað til almennan stovn ella grunn. Tílík delegatión kann bert verða givin við lóg.

Landsstýrið er útinnandi myndugleikin. Tá talan er um delegatión av fíggjarheimild, hevur løgtingið heimilað einum øðrum myndugleika enn landsstýrinum at hava eitt ávíst virksemi. Fyri at talan kann vera um lógliga delegatión er neyðugt, at tann, ið fær delegerað fíggjarheimild, er óheftur av landsstýrinum.

Delegatión av fíggjarheimild eigur bert at verða givin, tá talan er um ein "sjálvstøðugan" grunn/stovn, har tað er "natúrligt", at grunnurin/stovnurin hevur ein sjálvstøðugan roknskap og er uttan fyri fíggjarlóg. Óhefta støða grunsins skal vera verulig og ikki bert formlig. Hevur landsstýrið beinleiðis ávirkan, er ikki talan um óheftan grunn, men almennan grunn/stovn, sum tí eigur at verða tikin við í løgtingsfíggjarlóg og landsroknskap.

Um virksemið hjá einum almennum grunni/stovni skal haldast uttanfyri fíggjarlóg og/ella landsroknskap, eiga sera týdningarmiklar grundgevingar at tala fyri hesum. At tað er ynskiligt ella hóskandi er ikki nóg mikið.

Um fíggjarheimild skal delegerast er avgerandi, at løgtingið hevur eitt veruligt eftirlit við tí virksemi, ið delegerað verður. Hetta eftirlit verður tryggjað við:

1. at landsstýrið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok leggur roknskapirnar fyri tingið til kunningar,
2. at landsstýrið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar,
3. at løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapirnar,
4. at løgtingsgrannskoðararnir í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum.

Fyri at eftirlitið hjá løgtinginum skal vera veruligt er avgerandi, at roknskapirnir og grannskoðanin fylga teim ásetingum, sum annars verða settar til landsstovnar. Samanumtikið kann sostatt sigast, at fyri at ein delegatión skal vera lóglig er neyðugt:

- at delegatiónin verður givin við lóg,
- at talan er um serligar umstøður, har tað er natúrligt og har sera týdningarmiklar grundgevingar eru fyri, at fíggjarheimild verður delegerað,
- at tann, ið fær delegerað fíggjarheimild, er óheftur av landsstýrinum,
- at løgtingið hevur veruligt eftirlit við tí virksemi, ið delegatiónin fevnir um.

At týðandi partur av landsins virksemi liggur uttanfyri beinleiðis ávirkan frá landsstýrinum krevur, at viðurskiftini á hesum øki verða gjørd so greið sum gjørligt. Í lóggávuni eigur klárt at verða ásett,

- at útreiðslur ikki skulu takast við í fíggjar- ella játtanarlóg
- at inntøkur ikki skulu takast við í fíggjarlóg (kann bert gerast tá talan ikki er um skatt)
- at talan er um almennan grunn/stovn, sum er óheftur av beinleiðis ávirkan frá landsstýrinum
- hvørjar avleiðingarnar verða, um delegatiónin verður tikin aftur, serliga viðvíkjandi ognini

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum hava løgtingsgrannskoðararnir í fleiri ár víst á, at tað er sera óheppið, at ein stórur partur av landsins virksemi liggur uttanfyri ávirkan løgtingsins. Samstundis hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at tað í ávísum førum møguliga er í stríð við stýrisskipanarlógina, at grunnar ikki verða tiknir við á løgtingsfíggjarlógina. Hetta eigur at hava við sær, at grunnar/stovnar, sum í dag eru uttan fyri fíggjarlóg og tí eisini ávirkan og partvíst eisini eftirlit løgtingsins, framyvir í størst møguligan mun verða tiknir við á fíggjarlógina.

**3.** Um staðfest verður, at ein delegatión av fíggjarheimild er lóglig, er helst talan um stovn/grunn, har tað er natúrligt og hóskandi, at roknskapurin, verður hildin uttan fyri játtanarroknskapin. Fíggjarstøðan í landsroknskapinum eigur tó at fevna um eginogn/ogn og skuld hjá øllum landsstovnum/landsgrunnum, sjálvt um virksemið annars liggur uttan fyri játtanarroknskapin. Harumframt eigur roknskapurin at verða tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin.

Um talan harafturímóti er um landsstovnar/-grunnar, har delegatiónin ikki er lóglig, og hesir ikki verða tiknir við í landsroknskapin, er talan um brot á galdandi reglur. Tvær loysnir eru á hesum trupulleika:

1. Er talan um landsvirksemi, har tað er natúrligt og hóskandi, at roknskapurin ikki verður tikin við í *játtanarroknskapin*, kann delegatiónin gerast lóglig. Lógin skal fastleggja tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap. Samstundis er neyðugt, at roknskaparreglur, grannskoðanarreglur og eftirlit løgtingsins fylgja galdandi lógum.
2. Er talan um landsvirksemi, ið eigur at verða tikið við í játtanarroknskapin, er tað skylda hjá avvarðandi landsstýrismanni at fáa hesi viðurskifti í rættlag. T.e. at landsstovnar og –grunnar fylgja játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglunum.

## 3. Landsgrunnar

### *Landsgrunnar í søguligum baksýni*

**1.** Seinastu árini er gjørt eitt miðvíst arbeiði, har endamálið hevur verið og framvegis er, at alt búskaparligt virksemi hjá landinum skal avspeglast í løgtingsfíggjarlóg og landsroknskapi. Hóast nøkur ógreið viðurskifti framvegis eru á hesum øki, so kann ikki verða sagt annað, enn at rættiliga nógv er komið burtur úr hesum arbeiði. Fíggjarlóg og landsroknskapur geva í dag rættiliga gott yvirlit yvir, hvussu stórt virksemi í landinum, landskassin stendur fyri, bæði viðvíkjandi rakstri og løgum. Hetta yvirlit hevur ómetaliga stóran týdning í sambandi við búskapar- og fíggjarstýring landsins, herundir løguvirksemi landsins. Í áttatiárunum var lítið og einki yvirlit yvir búskaparliga virksemi landsins.

Løgtingsfíggjarlóg og landsroknskapur eru týðandi amboð hjá løgtinginum at stýra, ávirka og raðfesta útreiðslur og inntøkur landsins og eru við til at áseta, hvørjar heimildir, skyldur og hvørja ábyrgd landsstýrismaðurin hevur viðvíkjandi umsiting av játtanum. Fíggjarlógin og

ein stórur partur av landsvirkseminum framvegis er uttanfyri bæði fíggjarlóg og landsroknskap, er enn nakað eftir á mál.

**2.** Tað, sum sermerkti løgtingsfíggjarlógir og landsroknskapir í 1980-árunum var, at ein stórur partur av játtanunum á løgtingsfíggjarlógini vóru játtanir í sokallaðar landsgrunnar, og fyri hesar játtanir samsvaraðu játtanar- og roknskapartølini altíð í rakstrarroknskapinum hjá landskassanum. Nýtslan úr hesum grunnum varð harafturímóti skrásett á ymsum konti í fíggjarstøðuni hjá einstøku grunnunum, og tí bar ikki til at síggja í rakstrarroknskapinum hjá landskassanum, um ein meir- ella minninýtsla møguliga var í grunnunum. Samsvar var tí ikki millum játtan í løgtingsfíggjarlóg og veruligu útreiðlsu hjá grunnunum og tí eisini landskassanum í hvørjum fíggjarári.

Í frágreiðingini frá Grannskoðanardeild Landskassans fyri 1987 varð hildið, at játtanir í grunnar kundu vera skilagóðar, var talan um veruligar útreiðslur, og um løgtingið í árligu løgtingsfíggjarlógini gjørdi av, hvat og hvussu nógv skuldi verða brúkt úr grunnunum. Víst varð á, at við tí skipan, sum var, vóru játtanir í grunn ein heimild til verandi og komandi landsstýri at brúka pening uttanum tær árligu løgtingsfíggjarlógirnar. Hildið varð, at uppsetingin viðvíkjandi grunnum í landsroknskapinum var torskild, og víst varð á, at tá ið veruliga nýtslan úr grunnunum í 1987 varð gjørd upp, vóru avsettar 290 mió. kr. ov lítið í grunnar. Landsroknskapurin fyri 1987 vísti eitt rakstraravlop uppá 321 mió. kr., meðan veruliga rakstraravlopið bert var 31 mió. kr. í 1987.

Í frágreiðing frá Grannskoðanardeild Landskassans fyri 1988 varð víst á, at rakstraravlopið sambært landsroknskapinum var 32,8 mió. kr., men vórðu útreiðslurnar hjá grunnunum tiknar við yvir raksturin hjá landkassanum, so broytist avlopið til eitt hall uppá 212 mió. kr.

**3.** Fyrst í 1990-árunum fór landsstýrið undir at broyta játtanarskipanina við landsgrunnum. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1991 varð í viðmerkingunum víst á, at allir landsgrunnar, undantikið nakrir heilt fáir, skuldu verða tiknir av.

Um orsakirnar til, at farið varð burtur frá fíggjarlógarmannagongdini í 1980-árunum við landsgrunnum, vísti landsstýrið millum annað á, at tað higartil hevði verið ógjørligt við ársbyrjan at vita, hvussu stórt virksemi fór at verða framt yvir grunnsjáttanir. Sostatt var eisini ógjørligt frammanundan at vita, hvussu nógv gjaldførisfrágongdin úr landskassanum fór at vera í einum komandi fíggjarári, tí stórur partur av útreiðslum landskassans lá goymdur í grunnum. Hetta sama var galdandi, sjálvt um árligu grunsjáttanirnar vórðu hildnar, tí ein partur varð eisini fíggjaður við grunsjáttanunum frá árunum frammanundan. Politisku myndugleikarnir høvdu heldur ongan møguleika at gera sær eina mynd av, hvussu stórt almenna virksemið var í einstøku árunum, um ætlaða byggivirksemið í einstøku árunum ikki stóð á fíggjarlógini. Miðað varð tí eftir at seta alt tað ætlaða byggivirksemið á fíggjarlógina, samsvarandi framferðarháttinum í øðrum londum. Stórur partur av ætlaðu løguútreiðslum landskassans í 1991, stóðu tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1991.

Í framlagda fíggjarlógaruppskotinum fyri 1991 fekst eisini betur yvirlit yvir rakstrarútreiðslur landsins, tí nú komu flestu rakstrarútreiðslurnar at standa á fíggjarlógini. Fyri 1991 var torført at gera sær eina mynd av rakstrarútreiðslum landsins, tí munandi partur av nýtsluni varð fíggjaður umvegis landsgrunnar.

Árið eftir legði landsstýrið lógaruppskot fyri løgtingið um at taka av landsgrunnar. Við hesi lóg vóru 67 landsgrunnar tiknir av.

Í viðmerkingunum til uppskotið varð millum annað víst á, at ætlanin var nú at leggja um til eina skipan, har allar útreiðslur skuldu standa í fíggjarlógini, uttan mun til um tær vóru fíggjaðar við skatti, láni ella úr grunni. Einki samsvar hevði verið millum bruttoupphæddina í grunnunum og

ferðir størri enn fíggjarorka landskassans. Stundum hevði landsstýrið ikki sett pening av, ið mótsvaraði bruttojáttan grunsins, stundum hevði landsstýrið flutt pening yvir í landskassagjaldførið fyri at uppviga hall á øðrum økjum, og uppaftur í øðrum førum vóru grunnarnir sjálvir yvirtrektir.

Tað, at grunnarnir góvu eina órealistiska mynd av fíggjarorku landskassans, legði ofta stórt trýst á landskassan, bæði frá stovnsleiðarum og áhugabólkum. Av tí at eingin fíggjarorka lá aftanfyri tølini í roknskapunum, vóru krøvini frá áhugabólkunum fleiri ferðir størri enn møguleikar landsstýrisins at seta í verk byggingar og onnur tiltøk. Við nýggju skipanini varð bøtt munandi um møguleikarnar at gera haldgóða gjaldførisætlan og langtíðarfíggjarætlan.

At enda í viðmerkingunum førdi landsstýrið fram: "Samanumtikið fer ein landskassaroknskapur, har bert fáir grunnar eru, men har allar íløgur, íløgustudningar, rakstrarútreiðslur og útlánsheimildir standa í fíggjarlógini, at vera eitt munandi betri stýringsamboð hjá bæði politisku myndugleikunum og umsitingini, enn skipanin frammanundan. Harumframt fer nýggja skipanin at geva eina greiðari mynd av bæði rakstri og fíggjarstøðu landskassans, av tí at bæði fleiri og betri upplýsingar síggjast beinleiðis í fíggjarlógini. Hetta fer at geva bæði almenningi, politiskt valdum umboðum og útlendskum lánveitarum munandi betri kunnleika til gongdina í føroyskum búskapi enn frammanundan."

Meirilutin í fíggjarnevndini tók undir við uppskoti landsstýrisins, og lógin varð samtykt í løgtinginum. Í 1997 legði landsstýrið aftur lógaruppskot fyri løgtingið um at taka av landskassagrunnar, og tá vóru 15 grunnar tiknir av.

**4.** § 19-nevndin sigur soleiðis um skipanina við landskassagrunnunum: "§-19-nevndin er sannførd um, at skipanin við nógvu landskassagrunnunum var ein orsøk til, at politikarar og landsumsitingin mistu tamarhaldið á útreiðslum og gjaldføri landskassans í 1980-árunum, serliga seinast í 1980-árunum, tá ið upphæddirnar gjørdust stórar. Broytingin í fíggjarlógarmannagongdini á hesum øki kom tó alt ov seint, og ikki fyrr enn trupulleikarnar av álvara høvdu tikið seg upp. Skipanin við grunnunum gjørdi sítt til, at búskapurin var ovurspentur, og hetta sást ikki beinleiðis aftur í fíggjarlóg og landsroknskapi."

Niðurstøðan hjá § 19-nevndini um búskaparliga trupulleikan við landsgrunnum er sostatt greið. Tað er ógjørligt at hava nakað yvirlit yvir og stýring av landsins búskapi, um stórur partur av búskaparliga virkseminum verður stýrt umvegis landsgrunnar.

**5.** Fleiri landsgrunnar liggja enn uttanfyri fíggjarlóg og landsroknskap. Roknskapir hjá nøkrum av hesum grunnum verða árliga lagdir fyri løgtingið til góðkenningar. Í sambandi við framløguna av hesum roknskapum eru løgtingsgrannskoðararnir komnir við rættiliga hvassorðaðum viðmerkingum seinastu árini. Ført hevur verið fram, at við atliti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðan er støðan hjá hesum grunnum møguliga í stríð við stýrisskipanarlógina og lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini víst á búskaparligu stýringstrupulleikarnar, ið kunnu standast av landsgrunnunum. Nakrir landsgrunnar hava so stóra fíggjarorku, at teir lættliga kunnu avlaga búskaparliga virksemið í landinum. Í viðmerkingunum til framløguna av roknskapinum hjá Íleggingargrunninum fyri 1999, siga løgtingsgrannskoðararnir millum annað: "Talan er um ein sera múgvandi almennan grunn, sum hevur eina eginogn uppá umleið 600 mió. kr. Sum er, liggur grunnurin uttanfyri fíggjarlóg og landsroknskap, og løgtingsgrannskoðararnir halda tað ikki vera rætt, at ein nevnd einsamøll kann disponera yvir hesum stóra almenna kapitali. Vandi er fyri, at stór lán verða veitt uttan fyrilit fyri teim fíggjarligu karmunum, løgtingið leggur við árligu fíggjarlógini."

## 4. Tilknýti til fíggjarlóg

**1.** Virksemið hjá fleiri landsgrunnum verður ikki játtað í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Løgtingsgrannskoðararnir hava sett spurnartekin við, um tað er í tráð við stýrisskipanarlógina, at virksemið hjá landsstovnum og -grunnum ikki er tikið við í løgtingsfíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

***Galdandi lóggáva***

**2.** Heimastýrislógin varð samtykt á løgtingi 5. desember 1947 og kunngjørd sum kundgørelse nr. 11 af 31.03.1948 af Lov om Færøernes Hjemmestyre. Eftir at heimastýrislógin fekk gildi, varð farið undir at gera skipan fyri, hvussu heimastýrið skuldi virka innanhýsis. Hetta varð gjørt við løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum.

Heimastýrislógin býtir málsøki viðvíkjandi Føroyum upp í sermál, har løgtingið hevur lóggevandi valdið og landsstýrið útinnandi valdið, og felagsmál, sum verða umsitin av ríkismyndugleikum sambært danskari lóggávu.

Stýrisskipanarviðurskifti er føroyskt sermál. Tær ásetingar í stýrisskipanarlógini, sum verða viðgjørdar í hesum áliti, eru gjørdar við fyrimynd í ásetingum í grundlógini. Tulkingin av hesum ásetingum tekur tí støði í, hvussu somu ásetingar í grundlógini verða tulkaðar í Danmark, og við atliti til føroyska siðvenju.

Lóggávan um grunnar/sjálvsognarstovnar (fondslovgivningen) er felagsmál. Viðgerðin av spurningum, ið knýta seg til grunnar, tekur tískil útgangsstøði í danskari lóggávu og teimum serligu viðurskiftum, sum gera seg galdandi innan føroyska lógarøkið.

**3.** Í stýrisskipanarlógini frá 1948 eru ásetingar um inntøkur og útreiðslur landskassans. Eingin skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við lógtingslóg. Eingin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimilað í fíggjarlóg, galdandi, tá ið útreiðslan verður ávíst, ella í aðrari galdandi heimildarlóg.

Eftir at nýggja stýrisskipanarlógin varð samtykt í 1994, og fekk gildi í 1996, varð orðingin um inntøkur og útreiðslur eitt sindur broytt.

Í nýggju stýrisskipanarlógini er ásett um skatt, at eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. § 41, stk. 3 í stýrisskipanarlógini ásetir harumframt: "Áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi, er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í stk. 1". Sostatt skulu allir skattir við á fíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg. Tann materiella heimildin fyri at krevja skatt er oftani í aðrari lóggávu. Umframt materiella heimild krevst sostatt fíggjarlig heimild í fíggarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg. Er eingin heimild í fíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg, kann skattur ikki krevjast inn uttan at bróta ásetingina í § 41, stk. 3.

Soleiðis sum § 21 í stýrisskipanarlógini frá 1948 varð orðað, skilst, at eingin útreiðsla má verða goldin uttan at heimild fyrst er fingin í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg. Henda orðing verður eitt sindur broytt í stýrisskipanarlógini frá 1994: "Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ávíst verður.". Broytingin er málslig, soleiðis at ásetingin í nýggju stýrisskipanarlógini kemur at líkjast meiri ásetingini í grundlógini § 46, stk. 2. Broytingin í orðingini kann ikki tulkast sum ein broyting í rættarstandinum, sum var galdandi, áðrenn nýggja stýrisskipanarlógin fekk gildi í 1996.

Einki nærri verður sagt um, hvat fyri útreiðslur talan er um í § 43, stk. 2 í stýrisskipanarlógini. Ásetingin skal tulkast við atliti til fíggjarlóg, og sostatt eru tað bert útreiðslur hjá landsumsitingini, sum eru fevndar av hesi áseting. Landsumsitingin er allir landsstovnar, t.e. allar landsstýrisdeildir, stovnar undir hesum, serligir grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á játtanarlóg javnbjóðis teimum rættiligu landsstovnunum. Inntøkur og útreiðslur hjá landsins partafeløgum eru ikki inntøkur og útreiðslur hjá landskassanum, men hjá partafeløgunum sjálvum. Raksturin skal tí ikki takast við í landsroknskapin. Kommunur koma ikki undir § 43, stk. 2.

Meginreglan er sostatt, at skattainntøkur skulu hava heimild í løgtinglóg og kunnu ikki krevjast inn, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt. Allar útreiðslur skulu hava heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Hesar meginreglur hava verið galdandi síðani 1948.

***Fyrilit aftanfyri ásetingarnar um fíggjarvald løgtingsins***

**4.** Ásetingarnar viðvíkjandi skatti og útreiðslum landsins hava sín uppruna í donsku grundlógini. Í grundlóg og stýrisskipanarlóg er soleiðis eitt krav um, at skattur skal hava materiella heimild í lóg:

**Grl § 43:** "Ingen skat kan pålægges, forandres eller ophæves uden ved lov…"

**Sl § 41, stk. 1:** "Ingen direkte eller indirekte skat kan pålægges, forandres eller ophæves uden ifølge lagtingslov."

Harumframt er tað eitt stjórnarrættarligt krav, at skattainnkrevjingin umframt materiella heimild í lóg krevur fíggjarliga heimild í fíggjarlóg:

**Grl § 46:** "Forinden finansloven eller en midlertidig bevillingslov er vedtaget af folketinget, må skatterne ikke opkræves"

**Sl § 41, stk. 3** "Forinden lagtingsfinansloven, eller en midlertidig bevillingslov er vedtaget af lagtinget, må de i stk. 1 nævnte skatter ikke opkræves"

Um útreiðslur verður ásett:

**Grl § 46, stk. 2:** *"Ingen udgift må afholdes uden hjemmel i den af folketinget vedtagne finanslov eller i en af folketinget vedtaget tillægsbevillingslov eller midlertidig bevillingslov."*

**Sl § 43, stk. 2** *"Ingen udgift må afholdes, som ikke har hjemmel i den på anvisningstiden gældende finanslov eller i anden bevillingslov."*

Eitt av høvuðsfyrilitunum aftan fyri hesar ásetingarnar er, at lóggevandi myndugleikin (fólkatingið og løgtingið) skal hava ræði á og eftirlit við inntøkum og útreiðslum, sum útinnandi myndugleikin (stjórnin og landsstýrið) ræður yvir. Uttan heimild at útvega inntøkur, og uttan heimild at halda útreiðslur, kann útinnandi myndugleikin ikki virka. Løgtingið er tann játtandi myndugleikin og skal góðkenna fíggjarkarmarnar fyri virki landsstýrsins.

Fíggjarlógin, sum fíggjarætlan ella budget, varð sett á stovn, tá ið Danmark fór frá einaveldi til eina demokratiska skipan. Áðrenn grundlógina bar altíð til hjá kongi at brúka teir pengar, honum lysti. Ein týðandi partur av tí parlamentariska stríðnum hevur altíð verið stríðið um fíggjarvaldið. Hvør kann áleggja skatt, og hvør kann játta útreiðslur?

Grundleggjandi ætlanin við fíggjalógini er at tryggja, at hetta fíggjarvald skal liggja hjá fólkavalda tinginum, samstundis sum tingið fær møguleika at hava eyguni eftir, hvussu fíggjarlógin verður útint.

Tá talan er um eitt so grundleggandi inntriv í fíggjarviðurskiftini hjá privatum sum at krevja inn

skatt, er tað sera týdningarmikið, at eingin annar enn løgtingið kann skriva út skatt. Heimildin at áleggja skatt kann tí ikki gevast øðrum.

Fyrilitið aftanfyri ásetingina um almennar útreiðslur er ikki, at útreiðslur ikki kunnu verða hildnar uttan heimild í fíggjar- ella aðrari játtanarlóg. Fyrilitið er harafturímóti, at eingin útreiðsla skal vera hildin uttan demokratiskan legitimitet. Hetta merkir, at allar almennar útreiðslur skulu legitimerast so nær at veljaranum sum gjørligt og vera undir støðugum eftirliti frá valdum umboðum.

Her er talan um tvær bindandi stjórnarrættarligar ásetingar, har eingin skattur kann verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg, og har almennar útreiðslur ikki kunnu verða hildnar, uttan at løgtingið hevur eftirlit við hesum.

***Siðvenja***

**5.** Týdningurin av siðvenju verður ofta undirmettur. Siðvenja hevur ein annan og meira týðandi leiklut í stjórnarrættinum enn í borgararættinum. Í prinsippinum er siðvenjan hægsta rættarkelda, og er grundarlagið undir skrivaðu reglunum. Alf Ross lýsir týdningin av siðvenju sera beinrakið:

"[…] Forfatningsrettens grundlag er den effektive, sædvanemæssige efterlevelse ud fra en spontan følelse af retlig forbundethed.

For det andet på den måde, at specielle sædvaner spiller en stor rolle til fortolkning, supplering, eller omformulering af den skrevne ret. Dette beror på at den skrevne forfatning typisk er holdt i korte principielle vendinger, der lader mange enkeltheder stå åbne, samtidigt med at forfatningsdokumentet er omgærdet med en højtidelighed og en kvalificeret ændringsprocedure, der udelukker en jævnlig tilpasning til ændrede omstændigheder. Det kan derfor ikke undgås, at mange spørgsmål først finder deres besvarelse, eventuelt deres vekslende besvarelse, gennem det faktiske forfatningsliv. Den skrevne forfatning er som et skelet, der først får kød og blod og bliver en levende organisme gennem de sædvaner, der i praksis vokser op omkring teksten, og som gør det muligt i det stille, d.v.s. uden formelig forfatningsændring, at tilpasse forfatningen til udviklingens krav."

Tað er tí greitt, at orðingin í grundlógini og stýrisskipanarlógini kann broytast við siðvenju. At ein siðvenja er ein rættarsiðvenja merkir, at talan er um eina rættarfatan - eina fatan av galdandi rætti. Siðvenja, sum stjórnarrættarlig kelda, kann skiljast sum vanliga rættarfatanin, og sum landsins stovnar, tað verði seg løgting, landsstýri og almenna umsitingin annars liva eftir. Tað er ikki avgerandi, hvussu leingi ein siðvenja hevur verið, men ein longri siðvenja kann vera eitt prógv um, at talan er um eina veruliga rættarsiðvenju.

At siðvenja hevur ein týðandi leiklut í játtanarskipanini í Danmark sæst í "lov om revision af statens regnskaber" § 3:

"Ved revisionen efterprøves, om regnskabet er rigtigt, og om de dispositioner, der er omfattet af regnskabsaflæggelsen, er i overensstemmelse med meddelte bevillinger, love og andre forskrifter samt med indgåede aftaler og *sædvanlig praksis*."

Sama er galdandi í "lov om statsrevisorerne" § 2, stk. 3:

"Statsrevisorerne kontrollerer, at regnskabet er rigtigt, og at de dispositioner, der er omfattet af regnskabsaflæggelsen, er i overensstemmelse med meddelte bevillinger, love og andre forskrifter samt med indgåede aftaler og *sædvanlig praksis*."

Í Føroyum skulu løgtingsgrannskoðararnir:

"ansa eftir , at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og *vanligum siði*."

Siðvenja er sostatt sera týdningarmikil í sambandi við játtanarskipanina. Peter Germer sigur um hetta:

"Forfatningsretlige udredninger, der baseres på unuancerede retsteoretiske betragtninger, kan let få karakter af bevillingsretligt dilettanteri. Der er grund til at understrege, at en forfatningsretlig bedømmelse af konkrete budgetproblemer kræver indgående kendskab til *bevillingsmyndighedernes praksis*".

***Danska fíggjarnevndin***

**6.** § 46, stk. 2 í grundlógini krevur heimild í fíggjarlóg, eykajáttanarlóg ella bráðfeingis játtanarlóg, *áðrenn* útreiðslur kunnu verða hildnar. Hóast hetta, er siðvenjan í Danmark, at eykajáttanir verða lagdar fyri donsku fíggjarnevndina við fíggjarnevndarskjølum ("aktstykker"), sum *seinni* verða fomaliseraðar í eini eykafíggjarlóg, sum verður viðtikin eftir fíggjarárslok.

Peter Germer sigur soleiðis:

"Retsgrundlaget for statsbudgettet består ikke udelukkende af skrevne regler, men også af uskrevne bevillingsmæssige principper, som har udviklet sig i praksis med Folketingets finansudvalg som hovedaktør. Det er velkendt, at der – på trods af bestemmelsen i grundlovens § 46, stk. 2, om at ingen udgift må afholdes uden hjemmel i en af Folketinget vedtaget finanslov eller anden form for bevillingslov – kan afholdes nye udgifter i finansårets løb med tilslutning fra finansudvalget."

Grundlógarinnar § 46, stk. 2, kundi verið broytt til: "Ingen udgift må afholdes uden hjemmel i den af folketinget vedtagne finanslov eller i en af folketinget vedtaget tillægsbevillingslov eller midlertidig bevillingslov, *medmindre folketingets finansudvalg har givet sit samtykke dertil*." Mannagongdin er, at allar játtanir frá donsku fíggjarnevndini verða lagdar fyri fólkatingið í eini "ískoytisjáttanarlóg", ið verður samtykt, eftir at fíggjarárið er úti og sostatt er ein eykafíggjarlóg.

Ein broyting av eini áseting í grundlógini ella stýrisskipanarlógini má vera treytað av, at talan er um "at en almindelig anerkendt, bevidst retsopfattelse sætter sig igennem, ikke blot ved at en vis praksis tolereres eller passerer upåagtet." Ásetingar í grundlóg og stýrisskipanarlóg kunnu sostatt verða broyttar við siðvenju, um talan er um eina alment viðurkenda og tilvitaða fatan av galdandi rætti.

Føroysku reglurnar eru øðrvísi enn tær donsku á hesum øki. Megingreglan er, at eykajáttan verður veitt við løgtingslóg. Undantøk frá hesi meginreglu kunnu bert gerast í serligum førum. Um mál hevur skund, kann løgtingsins fíggjarnevnd eftir uppskoti frá landsstýrinum veita eykajáttan, uttan so er, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg. Eykajáttanir, sum fíggjarnevndin hevur veitt í einum fíggjarári, verða at góðkenna við eykafíggjarlóg í seinasta lagi 31. desember sama ár. Landsstýrið hevur skyldu at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi innan 1. desember.

§ 44 er nýggj, samanborið við gomlu stýrisskipanarlógina. Í mun til siðvenjuna hjá donsku fíggjarnevndini verður eykajáttan við fíggjarnevndarskjali ikki ofta givin. Hetta kann verða ein orsøk til, at grunnar verða settir á stovn. Við at stovna grunn, verður minni tørvur at biðja fíggjarnevndina um eykajáttan. Men hervið verður valdið á og eftirlitið við almennum útreiðslum, sum er tryggjað fíggjarnevndini og løgtinginum í stýrisskipanarlógini, munandi skert.

Í dag er semja um, at ásetingin í grundlógini § 46, stk. 2, er broytt við siðvenju. Danska fíggjarnevndin kann soleiðis játta útreiðslur. Spurningurin verður hereftir, um siðvenjan í Danmark er farin víðari, soleiðis at útreiðslur, sum ikki eru í fíggjarlóg, kunnu verða hildnar, uttan at danska fíggjarnevndin skal játta tær. Ein viðgerð av hesum spurningi er avgerandi fyri tulkingina av føroysku ásetingini í stýrisskipanarlógini § 43, stk. 2. Hetta tí, at § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini hevur sín uppruna í grundlógarinnar § 46, stk. 2, og grundleggjandi fyrilitini aftanfyri ásetingarnar tískil eru tey somu.

***Almennir stovnar/grunnar***

**7.** Samstundis sum danska fíggjarnevndin kann játta útreiðslur, er gjørligt hjá ávísum almennum

stovnum/grunnum í Danmark at hava síni egnu fíggjarviðurskifti atskild frá fíggjar- ella játtanarlóg, uttan at neyðugt er við játtan frá donsku fíggjarnevndini. Sum dømi heilt aftur í 1960-árini kunna nevnast Danski Tjóðbankin, Danski Hypotekbankin og Statsanstalten for Livsforsikring. Báðir teir fyrru stovnarnir vórðu hvørki tiknir við í fíggjarlóg ella statsroknskap, men rakstrarútreiðslurnar hjá Statsanstalten for Livsforsikring vórðu tiknar við í árligu fíggjarlógina, meðan fíggjarstøðan varð hildin uttanfyri statsroknskapin.

Ein røð av "statsgrunnum" eru stovnaðir í Danmark, har fíggjarstøða og rakstur verða hildin meiri ella minni uttan fyri fíggjarlógina og statsroknskapin. Eingin føst mannagongd er fyri, hvørjir grunnar verða tiknir við í fíggjarlóg ella statsroknskap. Við at tulka lógirnar fyri hvønn grunn sær, og ta siðvenju, sum er á einstøku økjunum í sambandi við ásetingina í grundlógini § 46, stk. 2, verður avgjørt um hesir skulu við í fíggjarlógina ella statsroknskapin

**8.** Í Danmark hevur spurningurin, um tað er í stríð við grundlógina, at útreiðslur hjá almennum stovnum/grunnum verða hildnar, uttan at tær eru tiknar við í fíggjarlóg ella lagdar fyri donsku fíggjarnevndina, verið viðgjørdur av ymiskum løgfrøðingum, sum eru komnir til ymiskar niðurstøður.

Alf Ross hevur ta fatan, at tað er grundlógarbrot, um útreiðslur verða hildnar, uttan at tær verða tiknar við í fíggjarlóg ella verða lagdar fyri donsku fíggjarnevndina. Hóast vísast kann á, at minni útreiðslur hava verið hildnar, uttan at tær hava verið lagdar fyri donsku fíggjarnevndina, kann hetta ikki tulkast, sum talan er um eina alment viðurkenda fatan av galdandi rætti, sum er neyðug fyri at kunna viðurkenna eina broyting av grundlógini.

Somu niðurstøðu kemur hann til í eini viðgerð av, um játtanir til Danmarks Radio skuldu leggjast fyri donsku fíggjarnevndina, ella um nóg mikið var at leggja eina játtanarumsókn fyri ráðharran í mentamálum.

Í sambandi við, at Danmarks Radio ikki varð tikið við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg, varð nevnd sett at meta um ymisk viðurskifti í sambandi við fíggjarligu og roknskaparligu viðurskiftini hjá Danmarks Radio. Nevndin bað sokallaða "professorudvalget" meta, um tað var í stríð við grundlógina § 46, stk. 2, at Danmarks Radio varð hildið uttan fyri fíggjar- og játtanarlógirnar. Serfrøðingarnir vóru ikki samdir, men nakrar almennar niðurstøður kunnu nevnast úr frágreiðingini.

**9.** Minnilutin, Alf Ross, metti, at um almennar útreiðslur skulu haldast uttanfyri vanligu játtanarskipanina og tað eftirlit, sum fólkatingið her hevur, má talan verða um "ganske ekstraordinære omstændigheder". Har talan er um virksemi, sum er ein liður í almennu umsitingini, má verða kravt, at grundlógarinnar orð verða fylgd. Hetta má eisini verða galdandi, um talan er um stovnar, sum hava ein óheftan leiklut í almennu umsitingini. Útreiðslur hjá slíkum stovnum mugu metast sum útreiðslur hjá tí almenna, og sostatt koma undir § 46, stk. 2 í grundlógini.

Undantøk frá hesi meginreglu kunnu einans gerast, har umstøðurnar gera tað ógjørligt ella nyttuleyst at taka stovnar við í vanligu játtanarskipanina, og tað samstundis er greið lógarheimild at víkja frá ásetingini í grundlógini. Sum dømi nevnir minnilutin almennar stovnar, hvørs virksemi verður rikið á vinnuligum grundarlagi, sum t.d. banka- ella tryggingarvirksemi, sum búskaparliga skal hvíla í sjálvum sær. Minnilutin metti ikki, at Danmarks Radio leyk hesar treytir. Tað merkir, at tað var í stríð við grundlógina at gera Danmarks Radio óheft av vanligu játtanarskipanini, partvíst tí at tað ikki var avgerandi neyðugt at halda stovnin uttan fyri játtanarskipanina, og partvíst tí eingin lógarheimild var fyri hesum.

førum er gjørligt at delegera heimildina at halda útreiðslur til annan myndugleika enn fólkating og/ella donsku fíggjarnevndina. Sum dømi nevna teir Danska Tjóðbankan, Danska Hypotekbankan og Statsanstalten for Livsforsikring. Teir staðfesta, at hetta bert eigur at verða gjørt í serstøkum førum, men taka ikki nakra generella støðu til, nær tað er gjørligt at seta á stovn slíkar óheftar stovnar, ið eru óheftir av játtanarmyndugleikanum. Teir leggja tó afturat, at talan eigur at vera um virksemi, har tað er natúrligt, at stovnurin hevur ein sjálvstøðugan roknskap og er óheftur av játtanarmyndugleikanum.

Í málinum um Danmarks Radio leggur meirilutin í "professorudvalget" dent á, at talan er um ein sjálvstøðugan stovn, at talan er um ein sjálvfíggjandi stovn og at leiðslan er sera óheft av politiska myndugleikanum. Hesa óheftu støðu meta teir at vera ein natúrligur liður í virkseminum hjá Danmarks Radio. Sostatt verður ikki mett, at tað er í stríð við grundlógarinnar § 46, stk. 2, at Danmarks Radio, við lóg verður hildið uttan fyri vanligu játtanarreglurnar hjá danska statinum.

Víðari siga teir, at henda rættarstøða seinni kann verða broytt við játtanarlóg. Tað merkir, at politiski myndugleikin við at seta Danmarks Radio á fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg kan broyta óheftu støðuna, sum stovnurin hevur. Tá hetta ikki hevur verið gjørt, er niðurstøðan, at Danmarks Radio kann verða hildið uttan fyri játtanarmyndugleikan.

**10.** Nevndin, ið varð sett at kanna viðurskiftini hjá Danmarks Radio, var eins og "professorudvalget" ósamd í síni niðurstøðu. Ein stórur meiriluti í nevndini (5 av 6 limum) kemur tó til somu niðurstøðu sum meirilutin í "professorudvalget". Meirilutin leggur serligan dent á,

" at Danmarks Radio i loven betegnes som en selvstændig offentlig institution,

at Danmarks Radio styres af et særligt, af kulturministeren uafhængigt råd, hvis medlemmer for langt de flestes vedkommende udpeges af folketinget og de i finansudvalget repræsenterede partier,

at Danmarks Radios virksomhed – både drifts- og anlægsvirksomhed – fuldt ud finansieres ikke af statsmidler, men gennem licenserne, der samles i en særlig fond, radiospredningsfonden, der efter loven er undergivet radiorådets bestyrelse

at budgetternes godkendelse ved lovens § 5, stk. 5, er henlagt til kulturministeren, jfr. også § 8, stk. 2, om godkendelse af lønningsregelement og normativ,

at budgetterne ifølge lovens § 10 vel skal optages som et særligt afsnit på finanslovens § 2, men at dette ifølge motiverne til lovbestemmelsen skal ske "som hidtil til orientering", og

at radiospredningslovens administration i årene fra 1926 til 1963 stemmer med den anførte forståelse af loven."

Alf Ross tulkar ásetingina um almennar útreiðslur snævurt. Hann førir fram, at allar almennar útreiðslur eiga at verða tiknar við í vanligu játtanarskipanina. Frávik frá hesi meginreglu kunnu bert gerast í heilt serligum førum, har umstøðurnar gera tað ógjørligt ella nyttuleyst at taka tær við í fíggjarlóg, og tað samstundis er greið lógarheimild at víkja frá ásetingini í grundlógini.

Meirilutin í "professorudvalget" og í nevndini, sum varð sett at viðgera spurningin, tulkar ásetingina í grundlógini meiri vítt. Hesir meta, at almennar útreiðslur í *serstøkum førum* kunnu haldast, um henda heimild er *delegerað við lóg*.

Talan eigur tó at vera um ein "sjálvstøðugan" stovn, sum er óheftur av politiska myndugleikanum, og at tað er "natúrligt", at stovnurin hevur ein sjálvstøðugan roknskap og er óheftur av játtanarmyndugleikanum. Samstundis leggur meirilutin dent á, at talan eigur at vera um ein „sjálvfíggjandi" stovn. Ein gjøgnumgongd av grunnum í Danmark vísir tó, at tað ikki í praksis hevur verið avgerandi, at grunnar eru sjálvfíggjandi, tá hugt verður at sambandinum til fíggjarlógina. Sigast kann sostatt, at praksis hesum viðvíkjandi er víðari enn tulkingin hjá meirilutanum í nevndini.

Allir partar eru tó samdir um, at fólkatingið skal hava eitt reelt eftirlit við slíkum sjálvstøðugum stovnum/grunnum. Henda treyt verður mett av vera lokin, tá talan er um Danmarks Radio. Serliga tí at meirilutin í nevndini fyri Danmarks Radio verður settur av fólkatinginum og, at fíggjarætlanin verður tikin við í fíggjarlóg, tó bert til kunningar, og ikki sum ein bindandi játtan.

Í 1973 varð radiológin broytt eftir uppskoti frá nevndini í Danmarks Radio, soleiðis at mentamálaráðharrin nú setir ein karm fyri fíggjarætlan hjá stovninum. Innan henda karm ger Danmarks Radio eina fíggjarætlan, sum bert verður send mentamálaráðharranum til kunningar. Óhefta støðan, stovnurin hevði frammanundan, varð við lógarbroytingini gjørd meiri greið.

Niðurstøðan hjá meirilutanum, bæði í nevndini og í "professorudvalget", er í tráð við ta siðvenju, sum hevur verið, bæði áðrenn og eftir at álitið varð gjørt í 1970. T.e., at útreiðslur hjá statsstovnum/-grunnum hava verið hildnar uttan fyri vanligu játtanarskipanina, hóast avmarkaðu treytirnar hjá Alf Ross ikki hava verið loknar. Út frá hesum kann tulkingin hjá Alf Ross ikki sigast at vera galdandi rættur.

Siðvenjan í Danmark er farin víðari, soleiðis at útreiðslur hjá statinum, sum ikki eru tiknar við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg, kunnu verða hildnar, eisini uttan at danska fíggjarnevndin skal játta tær. Statsstovnar/-grunnar kunnu í serstøkum førum við lóg fáa delegerað eina heimild at halda útreiðslur, uttan heimild í játtanarlóg ella frá donsku fíggjarnevndini. Spurningurin er so, um tað sama ger seg galdandi í Føroyum.

### *Praksis viðvíkjandi grunnum í Føroyum*

**11.** Í 1970-unum og 1980-unum var heilt vanligt at játta pening í landsgrunnar. Longu í 1989 vísir fíggjarnevndin á trupulleikan við, at grunnar liggja uttanfyri vanligu játtanarskipanina. "Fyri at fáa greiðar linjur í fíggjarlógini er rætt í framtíðini at broyta hesa skipan soleiðis, at tað greitt gongur fram í fíggjarlógini, hvat tað kostar at reka tað føroyska samfelagið."

Í viðmerkingunum til uppskot til løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m., sum varð løgd fram í 1992, verður víst á at ógreitt er, hvørjir stovnar/grunnar skulu við í landsroknskapin og fíggjarlógina: "Mett verður, at rættast er, at rakstrarútreiðslur og mettar inntøkur hjá øllum landsstovnum eiga at verða tiknar við á fíggjarlóg eftir nærri reglum".

Stórur partur av virksemi landskassans sást ikki í fíggjarlóg, bæði tí at virksemið varð fíggjað við lánum uttanum fíggjarlógina, og tí at tað varð fíggjað yvir grunsjáttanir frá árunum frammanundan. Sostatt var tað sera torført at gera sær eina heildarmynd yvir, hvussu stórt virksemi landskassans kundi verða einstøku árini.

Fyrstu ferð spurningur sæst reistur á løgtingi, um tað kann vera í stríð við stýrisskipanarlógina, at stovnar/grunnar ikki verða tiknir við í fíggjarlóg, er í uppskoti til samtyktar um góðkenning av roknkskapinum hjá Telefonverki Føroya Løgtings, sum varð lagt fyri tingið í 1993:

"Mælt verður landsstýrinum til at gera eina løgfrøðiliga meting av, um tað er í tráð við stýrisskipanarlógina, at virksemi telefonverksins (og hjá líknandi stovnum) ikki longur verður tikið við í fíggjarlógina."

Í skrivi til Løgtingsgrannskoðararnir svaraði landsstýrið soleiðis:

"Telefonverkið hevur í tey seinastu mongu árini ikki havt hall av rakstrinum. Men tá raksturin ikki bara vísir inntøkur, men eisini útreiðslur, er tað landsstýrisins meiting, at telefonverkið átti at verið tikið við í fíggjarlógina, jvb. § 21 í stýrisskipanarlógini. Henda skipan tykist eisini at vera galdandi í Danmark, har Post- og Telegrafvæsenet er tikið við í fíggjarlógini, sjálvt um raksturin netto hevur givið avlop."

Flestu av landsgrunnunum vórðu tiknir av við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum. Ein røð av grunnum hildu tó fram at virka sum áður. Orsøkin var, at "talan er um endamál, har komið verður fram til eina loysn eftir fleiri árum".

Aftur í 1997 vóru fleiri grunnar tiknir av við løgtingslóg nr. 94 frá 6. juni 1997 um avtøku av landskassagrunnum. Í viðmerkingunum til lógina verður víst á, at nakrir grunnar verða varðveittir. "Orsøkin er, at endamálið best verður røkt undir einari grunsskipan. Játtan verður latin úr hesum grunnum til ymisk tiltøk, men ofta er óvist, nær tiltakið fer í gongd, og nær peningurin fellur til gjaldingar. Ofta fevnir virksemið ikki bara um eitt ávíst fíggjarár og peningurin fellur tí ikki til gjaldingar fyrr enn t.d. eitt ár eftir, at peningurin er játtaður. Landsstýrið heldur tí, at endamálið hjá hesum grunnum virkar best fíggjarliga undir verandi skipan og ikki sum eitt rakstrarstað við vanligari rakstrar- ella íløgujáttan."

Fíggjarmálastýrið metir ikki at "*komið verður fram til eina loysn eftir fleiri árum*", kann sigast at vera ein haldgóð grundgeving fyri, at neyðugt er at halda grunnar uttanfyri játtanarskipanina.

Í uppskoti til samtyktar av landsroknskapinum fyri fíggjarárið 1999 verður "grunnaspurningurin" viðgjørdur:

"Í fleiri uppskotum til samtyktar hava løgtingsgrannskoðararnir víst á tað skeiva í, at útláns- og stuðulsvirksemi hjá fleiri almennum stovnum og grunnum ikki verður tikið við á fíggjarlógina. Vandi er fyri, at tað kann avlaga og undirgrava fíggjarligu karmarnar, sum Løgtingið leggur við árligu fíggjarlógunum, og vandi er eisini fyri at missa tamarhaldið á umsitingarútreiðslum, tá stovnar hava møguleika at fíggja sítt virksemi uttan um fíggjarlógina."

Um tað í serligum føri vísir seg at vera politiskur vilji fyri at stovnseta grunn, og halda henda uttan fyri fíggjarlóg og landsroknskap, er neyðugt, at ávísar treytir verða loknar. Hesar treytir verða nærri viðgjørdar niðanfyri undir pkt. 13. Tað er tó greitt, at løgtingsins ynski er, at grunnar í so stóran mun sum gjørligt, verða tiknir við í fíggjarlóg og landsroknskap. Spurningurin er, hvørja avleiðing hesar viðmerkingar frá løgtinginum, sum verða endurtiknar ár eftir ár, eiga at fáa.

***Góðkenning av landsroknskapinum v.m.***

**12.** Landsroknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til samtyktar. Sambært grundlógini skal statsroknskapurin verða lagdur fyri fólkatingið "til beslutning". Einki nærri er ásett um, hvat ein "samtykt" ella "beslutning" av roknskapinum merkir, og hvørja rættarliga avleiðing ein tílík samtykt hevur. Tað kann tó ikki vera ivi um, at talan má vera um eina góðkenning av einum roknskapi, á sama hátt sum ein roknskapur hjá einum partafelag verður lagdur fyri aðalfundin og góðkendur. Hetta fær serligan týdning, tá góðkenningin kemur frá einum, ið hevur heimild at átala viðurskifti í roknskapinum:

„Folketingets godkendelse af statsregnskabet har ingen betydning for andre end ministre. […] Godkendelsens virkninger må endvidere være begrænset til et eventuelt ansvar for sådanne dispositioner, som fremgår af regnskabet eller af de beretninger eller andre oplysninger, som er fremkommet i forbindelse med folketingets behandling af statsregnskabet."

Góðkenningin kann ikki tulkast sum, at løgtingið frásigur sær rættin at gera politiskar ella løgfrøðiligar avleiðingar galdandi, um tað seinni vísir seg, at viðurskifti, sum ikki eru komin fram í roknskapinum, hava verið í stríð við galdandi reglur. Góðkenningin eigur heldur at síggjast sum ein góðkenning av viðurskiftum, ið eru eyðsæð í roknskapinum ella umrødd í viðmerkingunum frá løgtingsgrannskoðarunum, soleiðis at løgtingið kann sigast at hava verið vitandi um tey.

Ein greið viðmerking, í hesum føri frá løgtingsgrannskoðarunum, sum verður góðkend av løgtinginum, eigur at fáa eina beinleiðis ávirkan á landsins umsiting. Ein viðmerking um, at landsgrunnar í størri mun eiga at verða tiknir við í fíggjarlógina eigur at føra við sær, at júst hetta verður gjørt.

Statsgrannskoðararnir vístu á, at Danmarks Radio átti at verið tikið við í vanligu játtanarskipanina. Ein minniluti í nevndini, ið var sett at kanna játtanarviðurskiftini hjá Danmaks Radio (Christian L. Thomsen) metti, at henda niðurstøða hjá statsgrannskoðarunum hevði so stóran týdning, at rættarstøðan varð broytt, soleiðis at Danmarks Radio hereftir varð fevnt av somu játtanar- og roknskaparreglum sum aðrar statsfyritøkur.

Hóast meirilutin ikki var samdur í hesi niðurstøðu, so hava viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum ein stóran politiskan týdning. Løgtingsgrannskoðararnir hava í fleiri ár í viðmerkingunum til landsroknskapin víst á, at tað møguliga er í stríð við stýrisskipanarlógina, at grunnar ligga uttan fyri fíggjarlógina. Tá løgtingið góðkennir roknskapin saman við viðmerkingunum frá løgtingsgrannskoðarunum um "grunnaspurningin", góðkennir tingið tey sjónarmið, sum eru førd fram um henda spurning. Her er sostatt talan um eina greiða áheitan á landsstýrið um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

***Delegatión***

**13.** At játtanarheimildin í Danmark partvíst verður givin til donsku fíggjarnevndina er ikki ein spurningur um delegatión av fíggjarvaldinum. Her er talan um rættarsiðvenju, ið broytir grundlógarásetingina. Ein tílík siðvenja kann bert broytast við eini grundlógarbroyting, ella við eini nýggjari rættarsiðvenju.

Alf Ross hevur hesa allýsing av delegatión: Delegatión fyriliggur, tá ein myndugleiki (t.d. lóggevari) heimilar einum øðrum (t.d. eini nevnd) at áseta reglur, sum myndugleikin (lóggevarin) sjálvur kundi ásett, og við sama rættargildi (retskraft), sum um ásetingini varð gjørd av tí, ið delegerað hevur (lóggevaranum).

Sambært Opsahl umfatar hugtakið delegatión: "Myndighed til at udstede forskrifter samt myndighed til at træffe afgørelser, som i grundloven eller lov er tillagt parlamentet". Zahle hevur tó ta fatan, at hetta ikki kann tulkast, sum um at nakað verður tikið burtur frá fólkatinginum, men heldur, at ein heimild verður givin at áseta nærri reglur innan fyri eitt avmarkað øki.

Greitt er, at landsstovnar og -grunnar, bæði í Føroyum og í Danmark, í ávísum førum liggja uttanfyri fíggjarlógina. Her er talan um rættarsiðvenju, ið heimilar fólkatinginum og løgtinginum at delegera part av fíggjarvaldinum, sum er tryggjað lóggevandi valdinum í grundlóg og stýrisskipanarlóg. Teir ymisku landsstovnarnir og -grunnarnir hava tó ikki fingið eina sjálvstøðuga støðu, sum kann sigast at vera tryggjað við eini rættarsiðvenju. Talan er harafturímóti um eina delegatión frá løgtingi, av einum avmarkaðum fíggjarvaldi. Hetta vald (ella heimild) er tó ikki tikið burtur frá løgtinginum.

Í áliti til løgtingsfíggjarlóg fyri ár 2000 metir fíggjanevndin, at stýrisskipanarlógin § 43, stk. 2, skal tulkast sum, at løgtingslóg ikki er nóg góð heimild fyri at brúka pening. Tað krevst harumframt, at útreiðslan stendur í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Sambært hesi tulking er delegatión av fíggjarheimild ikki gjørlig, tvs., at tað krevst bæði materiel og fíggjarlig heimild, áðrenn almennar útreiðslur kunnu haldast.

Fíggjarmálastýrið metir ikki, at henda tulking er í tráð við ta siðvenju, sum var galdandi, áðrenn nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi í 1996 og heldur ikki eftir 1996. Løgtingið hevur, bæði

áðrenn og eftir 1996, sett grunnar á stovn og hildið teirra virksemi uttan fyri fíggjarlóg og aðra játtanarlóg. Her er talan um delegatión av fíggjarheimild. Hóast henda delegatión møguliga ikki er givin á lógligan hátt, so er greitt, at landsins útreiðslur kunnu verða hildnar uttan heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Tronga tulkingin hjá fíggjarnevndini kann metast at liggja tætt upp at tulkingini hjá Alf Ross av grundlógarinnar § 46, stk. 2, men hetta er ikki galdandi rættur, hvørki í Danmark ella í Føroyum.

Spurningurin er so, nær og hvussu ein tílík delegatión kann gevast, ella nær ein delegatión er lóglig.

Í hesum sambandi er týdningarmikið at skilja millum hugtøkini "uden ved lov" og "ifølge lov", á føroysum "uttan við lóg" og "uttan heimild í lóg". "Uttan við lóg" er ein trongri orðing enn „uttan heimild í lóg".

§ 41 í stýrisskipanarlógini - „Eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin *uttan við løgtingslóg*" - kann bert tulkast sum, at delegatión ikki er møgulig. „Uttan við lóg" má tulkast sum, at skattainnkrevjing bert kann fremjast við lóg, t.e., at bert løgtingið kann áleggja skattir, og at skattir ikki kunnu áleggjast av landsstýrismanni við kunngerð, hóast heimild er fingin við lóg.

Stýrisskipanarlógin § 43, stk. 2, ásetir, at „Eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at *heimild er fyri henni* í teirri fíggjarlóg, ella aðrari *játtanarlóg*, ið er í gildi, tá ið ávíst verður." Ein materiel heimild í eini løgtingslóg kann vera nøktandi, tvs., at fíggjarlig heimild í fíggjarlóg ikki er neyðug.

Innihaldið í delegatiónini avmarkar tað virkisfrælsi, sum ein stovnur/grunnur hevur sambært delegatiónini. Fyrst og fremst verður delegatiónin avmarkað við teimum málsøkjum, delegatiónin viðvíkur. Tað kann vera at veita lán til ávís endamál, t.d. bygging av sethúsum ella skipum. Soleiðis er avmarkað, hvat virksemi ein ávísur stovnur/grunnur kann hava. Tann politiska og rættarliga avmarkingin í delegatiónini vil siga, at landsstýrið og løgtingið kunnu finnast at virkseminum hjá ymiskum grunnum og eisini, at løgtingið kann broyta ella taka aftur ta delegatión, sum givin er.

Landsgrunnarnir skulu standa politiskt til svars yvir fyri bæði landsstýri og løgtingi, men rættarliga kunnu grunnarnir ikki avmarkast meira enn tað, sum delegatiónin fevnir um. Hvat henda delegatión fevnir um, má svarast fyri hvønn grunn sær. Men hvat viðvíkur útreiðslum, er svarið tað sama fyri allar landsgrunnarnar. Grunnarnir kunna hava heimild at áseta sínar egnu útreiðslur. Hetta er tó treytað av, at delegatiónin er lóglig. Henda heimild er bert avmarkað við endamálinum hjá einstøku grunnunum. Hetta skal skiljast soleiðis, at ein grunnur kann verða rikin ábyrgdarleyst og ineffektivt, uttan at hetta nýtist at fáa rættarligar avleiðingar.

Um løgtingið ynskir at broyta virksemið hjá einum grunni, er møguligt at broyta lógina. Um landsstýrið ynskir broytingar, kann hetta møguliga gerast við at broyta kunngerð ella viðtøkur fyri grunnin, ella við at nevnd ella stjórn verða koyrd frá.

Løgtingið kann delegera ein part av fíggjarvaldi sínum við at stovna grunnar og heimila hesum at halda útreiðslur uttan um landsins játtanarmyndugleika. Fíggjarvald merkir her, heimildin at nýta pening uttan heimild í fíggjarlóg. Grundleggandi fyrilitini aftan fyri ásetingarnar um fíggjarvald løgtingsins í stýrisskipanarlógini - eftirlitsskylda og eftirlitsrættur løgtingsins - verða tó tryggjað gjøgnum lóggávuna:

- **Stýrisskipanarlógin § 45, stk. 4**: Reglurnar um landskassaroknskapin og grannskoðan av hesum verða eisini nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

- **Lóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. § 4, nr. 2**: Løgtingsgrannskoðararnir

fara ígjøgnum roknskapir hjá landsstovnum o.l., um hesir ikki eru við í landsroknskapinum.

- **Lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m. § 2, stk. 1**: Reglurnar um roknskaparhald landsins fevna um alla landsumsitingina, allar landsstovnar og stovnar v.m., hvørs rakstrarætlan er tikin við í játtanarlóg.
- **Kunngerð um roknskaparverk landsins o.a. § 2, stk. 1**: Reglurnar um roknskaparverk landsins eru galdandi fyri allar landsstovnar, t.e. allar landsstýrisdeildir, stovnar undir hesum, serligar grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru í játtanarlóg javnbjóðis teimum rættiligu landsstovnunum.

Hvussu ein "sjálvstøðugur roknskapur" skal skiljast, er ikki lýst í lóggávuni. Tulkingin av hesum hugtaki má gerast við atliti at landsroknskapinum. Hjá vanligum landsstovnum verða allar útreiðslur, allar inntøkur og fíggjarstøðan tikin við í landsroknskapin. Hjá stovnum, ið hava sjálvstøðugan roknskap, verður ofta bert fíggjarstøðan og í nøkrum førum partar av rakstrarroknskapinum tikin við í landsroknskapin.

Hóast nakrir landsgrunnar hava ein sera sjálvstøðugan leiklut, skulu hesir vera undir eftirliti, bæði av landstýrinum og av løgtinginum. Gjøgnum landsroknskapin og grannskoðanina av hesum, hevur løgtingið eftirlit við, at virksemið hjá landsumsitingini er farið fram sambært galdandi reglum. Sama er galdandi við roknskapi og grannskoðanini av roknskapinum hjá landsstovnum og -grunnum, ið ikki verða tiknir við í landsroknskapin. Roknskapir hjá nøkrum almennum grunnunum verða lagdir fyri løgtingið til góðkenningar. Grundleggandi fyrilitið aftan fyri ásetingini í stýrisskipanarlógini um fíggjarvald løgtingsins verða við hesi mannagongd eftirlíkað. Um roknskapir hjá landsgrunnum ikki verða lagdir fyri løgtingið, er talan um brot á reglurnar um eftirlitsrætt og eftirlitsskyldu løgtingsins.

Í Føroyum er eingin føst mannagongd hvat viðvíkur delegatión av fíggjarheimild. Hetta er óheppið, serliga í teimum førum har ynskiligt er, at politiski myndugleikin, serliga tann lóggevandi, hevur ávirkan á virksemið hjá ávísum grunnum. Teir sjálvstøðugu grunnarnir, ið liggja uttan fyri fíggjarlóg, eru sera ymiskir. Nakrir virka næstan sum vinnurekandi grunnar eftir marknaðartreytum, aðrir virka sum stuðuls- og/ella lánsgrunnar, og aðrir virka sum ein vanligur partur av landsumsitingini. Lóggávan er í flestu førum rættiliga ógreið viðvíkjandi tilknýti til fíggjarlóg, roknskaparreglum og grannskoðanarreglum. Tað er rættiliga tilvildarligt, hvørjir roknskapir verða lagdir fyri løgtingið, umframt at roknskaparreglurnar eru sera ymiskar, og fylgja ofta ikki teimum reglum, sum eru galdandi fyri vanligar landsstovnar.

Fyri at eftirlitið hjá tinginum skal vera veruligt, er avgerandi, at bæði roknskaparreglur og grannskoðanarreglur lúka tey krøv, ið sett verða landsstovnum annars, umframt at roknskapirnir verða lagdir fyri tingið.

### *Landsstovnar og –grunnar, sjálvsognarstovnar og sjálvstøðug fyrisitingarsubjekt*

**14.** Landsfyritøkur, landsstovnar og landsgrunnar eru partar av landsumsitingini. Meginreglan er, at útreiðslur, inntøkur og fíggjarstøðan hjá tílíkum stovnum skulu við í landsroknskapin.

Ivin stendst, tá stovnar/grunnar liggja á markinum til, um teir eru at rokna sum landsstovnar, ella talan er um sjálvsognarstovnar stovnaðir á privatrættarligum grundarlagi. Harumframt kann talan vera um landsstovnar/-grunnar, sum hava fingið delegerað fíggjarheimild.

Heitið "grunnur" verður nýtt rættiliga tilvildarligt í lóggávu og fyrisitingarmálbrúki. Tað ber tí ikki til at knýta serligar rættarreglur til, um heitið á einum stovni er "grunnur". Hvørja løgfrøðiliga

støðu hesin hevur má tí avgerast út frá einari almennari løgfrøðiligari allýsing, samanhildið við eini ítøkiligari meting av tí einstaka grunninum. Í løgfrøðiligari merking er ikki munur á einum grunni og einum sjálvsognarstovni - ein grunnur er ein sjálvsognarstovnur.

**15.** Heitið „almennur grunnur" er ikki eintýðugt løgfrøðiligt hugtak. Hvat hugtakið „grunnur" fevnir um, er harafturímóti rættiliga klárt. Fyri at talan skal vera um „grunn", í løgfrøðiligari merking, skal hesin hava ávís eyðkenni. Heitið grunnur í løgfrøðiligari merking er ein sjálvsognarstovnur, t.e. „ein, sum eigur seg sjálvan", og sum er stovnaður á privatrættarligum grundarlagi. Tað merkir, at landið eigur ikki grunnin og kann ikki við lóggávu avtaka grunnin ella ráða yvir ogninum, uttan at koma í stríð við ognarrættin hjá grunninum, sum er tryggjað í grundlógini § 73. Høvuðseyðkenni fyri tílíkar sjálvsognarstovnar/grunnar eru:

- Grunnurin skal hava eitt endamál, § 7, stk. 1, nr. 4
- Grunnurin skal hava ein kapital, § 9
- Grunnurin skal hava eina sjálvstøðuga leiðslu, sum er leys av stovnarunum
- Kapitalurin má ikki kunna flytast aftur til stovnararnar

Vanliga verður ein grunnur stovnaður á tann hátt, at ein ogn verður løgd til eina sjálvstøðuga leiðslu (t.d. nevnd ella stýri), sum skal røkja nøkur nærri ásett endamál, ið stovnarin hevur fyrisett. Ognin hjá grunninum fellur ikki í arv, og um grunnurin verður tikin av, verður ognin ikki útgoldin til stovnaran. At talan er um sjávsognarstovn tryggjar, at eingin annar uttan stovnurin sjálvur hevur ognarrættin yvir fænum. Í sambandi við avtøku, kann nettoognin bert útgjaldast til tey endamál, sum viðtøkurnar áseta.

Í donskum rætti er semja um, at

"formuen skal være *effektivt udskilt fra stifterens og biddragyderens formue* – i modstat fald foreligger der ikke en selvstændig fond.[…]

denne betingelse har to sider, dels at fondens aktiver allerede ved oprettelsen skal være *uigenkaldeligt overdraget til fonden*, dels at *fondens midler ikke efterfølgende må kunne tilbageføres til stifteren* eller personer, der er nærtstående med stifteren."

Eitt av høvuðsfyrilitinum aftanfyri hesa megingreglu er atlitið til ognararnar hjá stovnaranum. Uttan hesa reglu kundu persónar og virki flutt ognir til eina sjálvstøðuga eind, har ognarar ikki høvdu møguleika at tryggja síni krøv mótvegis stovnaranum, samstundis sum stovnarin hevur ræðisrættindi til ognirnar.

Sjálvsognarstovnar verða ikki settir á stovn við lóg. Løgtingið, sum er stovnarin í tílíkum førum, kann altíð broyta lógina ella taka stovnin av. Henrik Zahle sigur her:

„Det er et fundamentelt princip i forfatningsretten, at en lov til enhver tid kann ændres ved en senere lov. En lovs "lovkraft" gør ikke loven immun overfor senere modstridende lov. En lov kan ikke optage en bestemmelse, hvorefter loven ikke vil kunne ændres ved senere lov. Den fremtidige lov har det sidste ord – indtil videre."

Tann grundleggandi treytin fyri, at talan kann vera um ein sjálvsognarstovn er í tílíkum føri ikki lokin, nevniliga at: "Fondens midler ikke efterfølgende må kunne tilbageføres til stifteren." At ein lóg ásetir, at ein stovnur er ein sjálvsognarstovnur ella ein sjálveigandi stovnur hevur ikki týdning fyri, hvørja løgfrøðiliga støðu ein stovnur ella grunnur hevur.

**16.** Løgfrøðiligir spurningar í sambandi við "landsgrunnar" hava fleiri ferðir stungið seg upp, bæði í Føroyum og Danmark. Nøkur dømi úr Danmark kunnu geva eina mynd av skilnaðinum millum grunnar í løgfrøðiligari merking og almennar grunnar, ið verða reguleraðir eftir lóggávuni fyri einstøku "grunnarnar".

1. "Grundforskningsfonden" hevur ávísar grunnsrættarligar ásetingar. Serliga § 7, sum ásetir, hvussu ognin skal brúkast. Grunnurin verður stjórnaður av eini óheftari nevnd, sum verður tilnevnd av undirvísingarmálaráðharranum og granskingarmálaráðharranum, sí § 2. Granskingarmálaráðharrin hevur eftirlit við grunninum, og ársroknskapurin skal grannskoðast av ríkisgrannskoðanini og av einum statsgóðkendum grannskoðara. Í § 12 kemur fram, at talan ikki er um ein grunn í løgfrøðiligari merking: "Danmarks Grundforskningsfond kan ophæves ved lov. Ved ophævelse af fonden overtager statskassen fondens formue og indtræder i øvrigt i fondens rettigheder og forpligtelser."

2. "Vækstfonden" skal menna nýskapan av vinnulívinum, sí § 1. Grunnurin verður stjórnaður av eini óheftari nevnd, sí § 3. Grunnurin kann eisini taka ímóti gávum, sí § 5, 2. pkt. Í § 11 kemur fram, at talan er um ein veruligan grunn í tí, sum júst ikki er ein grunnur: „Vækstfonden kan ophæves ved lov. Ved ophævelse af fonden overtager statskassen fondens formue og indtræder i øvrigt i fondens rettigheder og forpligtelser. Gaver, som tilføres fonden, vil dog skulle anvendes til formål som beskrevet i § 1." Tann parturin av "Vækstfonden", ið ikki fellur aftur í statskassan, men bert kann nýtast til endamálið hjá grunninum, lýkur treytirnar fyri at vera ein grunnur í løgfrøðiligari merking. Restin av "grunninum" er ein "almennur grunnur".

   Í dømunum niðanfyri er ikki talan um grunnar í løgfrøðiligari merking, men um tveir almennar stovnar (særlige forvaltningssubjekter), ið eru stovnaðir sambært lóg og eru undir almennum eftirliti. Stovnarnir eru rættiliga sjálvstøðugir í sínum virksemi, men hetta hevur ikki við sær, at teir kunnu metast sum sjálvsognarstovnar.

3. "Lov om garantifond for indskydere og investorer" ásetir í § 1, at grunnurin er ein *privatur sjálvsognarstovnur*. Grunnurin verður stjórnaður av eini óheftari nevnd, sum verður sett av búskaparmálaráðharranum, sí § 18. Tá tað í viðmerkingunum til lógina stendur, at grunnurin ikki er umfataður av lóg um vinnurekandi grunnar, førur tað við sær, at talan júst ikki er um ein privatan sjálvsognarstovn, men heldur um ein almennan tryggingarstovn. Við orðingini "privatur sjálvsognarstovnur" í lógarinnar § 1, vil lóggevari allarhelst halda stovnin uttanfyri landsumsitingina, men talan er um eitt misfostur, tí at privatir sjávsognarstovnar verða ikki stovnaðir við lóg.

4. Í einum rættarmáli í hægstarætti um "Værdipapircentralen" varð staðfest: "Selv om Værdipapircentralen efter § 2 i lov om en værdipapircentral er en *privat selvejende institution*, må den efter sin struktur og sit formål ligestilles med en offentlig institution."

Tað eru almenn áhugamál knýtt at virkseminum í øllum hesum grunnum. Lógin um vinnurekandi grunnar hevur nøkur áhugaverd undantøk, sum vísa, at ætlanin er, at „almennir grunnar" ikki skulu verða fevndir av reglunum um grunnar í vanligari løgfrøðiligari merking:

- Grunnar, sum verða stovnaðir við lóg ella við heimild í lóg *og* eru undir almennum eftirliti, fella uttanfyri grunnalóggávuna.

- Grunnar, har treytin fyri at fáa góðkenning ella stuðul frá tí almenna er, at grunnurin er undir eftirliti og búskaparligari stýring av einum almennum stovni, fella uttanfyri grunnalóggávuna.

Harafturat kemur, at § 1, stk. 5, ásetir, at: "Fondsmyndigheden kan med industriministerens samtykke bestemme, at en fond, som på en anden måde end efter denne lov er undergivet offentligt tilsyn og økonomisk kontol, helt eller delvis skal være undtaget fra loven."

**17.** Virksemi, sum má metast sum alment, har tað almenna fíggjar ein stóran part av virkseminum, og har tað almenna samstundis hevur eftirlit við virkseminum, er ofta *ikki* talan um grunn í vanligari løgfrøðiligari merking, men um ein almennen stovn/grunn, eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt.

Í 1998 varð álit gjørt um almennar grunnar í Danmark. Í hesum áliti verður skilnaðurin millum "almennar grunnar" og grunnar í løgfrøðiligari merking viðgjørdur. Her sæst, at flestu av teimum almennu grunnunum ikki eru grunnar í løgfrøðiligari merking, men heldur er talan um "særlige forvaltningssubjekter". Hesir almennu grunnar mangla tað avgerandi eyðkennið fyri grunnar í løgfrøðiligari merking, nevniliga tað sjálvseigandi. Virksemið í hesum grunnum hevur vanliga ein almennan áhuga. Tey almennu áhugamálini hava ofta støði í:

- At stovnurin/grunnurin er stovnaður við eini almennari fyriskipan
- At fæið kemur heilt ella partvíst frá tí almenna
- At stovnurin/grunnurin í stóran mun er bundin av almennum stuðli

Tað er ein politisk avgerð, at ávíst virksemi verður lagt í meira ella minni óheftar stovnar/grunnar, uttan at tað almenna frásigur sær endaliga ognarrættin og stýringina av virkseminum, sum júst er ein treyt fyri, at talan kann vera um grunn í løgfrøðiligari merking. Stjórnin/landsstýrið kann ofta gera ella broyta viðtøkur, seta nevnd og avtaka ella broyta "grunnin". Ofta ger lóggevandi myndugleikin av, hvat skal henda við ognini, um grunnurin/stovnurin verður tikin av. Hesi viðurskifti gera, at talan ikki kann vera um ein grunn í løgfrøðiligari merking, men um eitt "sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt".

Tað, sum eykennir sjálvstøðug fyrisitingarsubjekt er, at tað er stovnað við serligari lóggávu, sum hevur ásetingar um virksemi, leiðslu og heimildir hjá landsstýrinum/ráharranum.

At ein stovnur er eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt merkir, at landsstýrismaðurin/ráðharrin ikki hevur vanligar instruktiónsheimildir mótvegis stovninum. Tó kann landsstýrismaðurin í ávísan mun hava ávirkan, um hann velur leiðslu og nevnd, hevur eftirlit við virkseminum ella kann broyta viðtøkur fyri stovnin.

Játtanarliga verða sjálvstøðugu fyrisitingarsubjektini ofta fíggjað við egnum inntøkum ella játtan á fíggjarlóg. Virksemið verður ofta ikki tikið við í fíggjarlóg, og ognin er leys frá landskassanum. Í hesum førum kann talan vera um delegatión av fíggjarheimild, sí punkt 13.

Hóast raksturin hjá sjálvstøðugu fyrisitingarsubjektunum ikki er við í fíggjarlóg, og/ella ognin verður hildin atskild frá landskassanum, eru tey tó at rokna sum landsstovnar, og koma í útgangsstøðuni undir vanligar fyrisitingarligar reglur, tó við teimum undantøkum, sum fylgja av teirra serligu støðu.

**18.** Tá tosað verður um grunnar, er ofta talan um vanliga játtan á fíggjarlógini. Talan kann vera um, at landið letur eina nevnd umsita stuðulsskipanir, sum í høvuðsheitum eru fíggjaðar úr landskassanum. "Grunnarnir" eru stovnaðir annaðhvørt við lóg ella við heimild í lóg, ella hava teir bert árligar játtanir, uttan serstøk lóg er um teirra virksemi. 3 "grunnar", ið ikki eru annað enn partar av landskassanum eru:

- Bilvraksgrunnurin
- Vegagrunnurin
- Apoteksgrunnurin

Teir báðir fyrru grunnarnir verða tiknir við í fíggjarlóg og játtanarroknskapin, meðan apoteksgrunnurin partvíst verður hildin uttan fyri fíggjarlóg og bert verður tikin við í landsroknskapin sum fylgiskjal.

Tá landið hevur sett grunnar á stovn, og virksemi teirra er treytað av árligum játtanum, hava teir ikki nakra sjálvstøðuga støðu og eru tí at rokna sum partur av landsumsitingini. Hóast nakrir av hesum grunnunum hava eina nevnd, og virksemið hjá nøkrum er ásett við lóg, er ikki talan um delegatión av fíggjarheimild. Tað kann tí ikki vera ivi um, at slíkir "grunnar" skulu við í fíggjarlóg og landsroknskap á sama hátt sum vanligir landsstovnar.

***Niðurstøða***

**19.** Í § 41 í stýrisskipanarlógini verður ásett, at eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má vera álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Í § 41, stk. 3, í stýrisskipanarlógini verður harafturat ásett, at eingin skattur má verða kravdur inn, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi. Tað er sostatt neyðugt bæði at hava materiella heimild í løgtingslóg og fíggjarliga heimild í fíggjarlóg, áðrenn skattir kunnu krevjast inn. Her er talan um bindandi stjórnarrættarligar ásetingar, ið ikki loyva undantøkum – heimildin at áleggja ella broyta skattir kann ikki delegerast.

Ásetingin í stýrisskipanarlógini § 43, stk. 2, um almennar útreiðslur, má tulkast við støði í grundlógarinnar § 46, stk. 2. Bæði § 46, stk. 2, í grundlógini og § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini eru broyttar við siðvenju. Besta prógv, at talan er um rættarsiðvenju, er, at henda siðvenja gjøgnum longri tíð hevur verið fylgd og góðkend av lóggevandi og útinnandi myndugleikum bæði í Danmark og í Føroyum.

Stýrisskipanarlógin § 43, stk. 2, kann tulkast soleiðis, at landskassans útreiðslur í serstøkum førum kunnu verða hildnar uttan at verða tiknar við í fíggjarlóg, um heimildin er delegerað við lóg. Tað er eitt stjórnarrættarligt krav, at delegatión bert kann veitast við lóg. Henda heimild eigur at vera greið, soleiðis at ivi ikki stendst um delegatiónina og hvat hon fevnir um. Málið um Danmarks Radio er dømi um eina ógreiða lóg, har ivi var um, hvussu delegatiónin skuldi skiljast.

Delegatión av fíggjarheimild eigur bert at verða givin, tá talan er um ein "sjálvstøðugan" grunn, sum er óheftur av landsstýrinum, og har tað er "natúrligt", at grunnurin hevur ein sjálvstøðugan roknskap og er uttan fyri fíggjarlóg. Neyðugt er, at grunnurin hevur veruliga óhefta støðu, og ikki bert formliga. Soleiðis vil beinleiðis ávirkan hjá landsstýrinum hava við sær, at talan ikki er um ein óheftan grunn, og at hann tí eigur at verða tikin við í fíggjarlógina. Um leiðslan í grunninum harafturímóti verður sett av eini óheftari nevnd, og landsstýrið ikki hevur vanligar instruktiónsheimildir mótvegis nevndini, kann talan verða um ein veruliga óheftan grunn.

At virksemið hjá einum grunni natúrliga eigur at liggja uttan fyri fíggjarlóg merkir, at sera týdningarmiklar grundir tala fyri hesum. At tað er ynskiligt ella hóskandi er ikki nóg mikið. Ein óheft støða kann verða neyðug, tá talan er um vinnuligt virksemi, sum skal grundast á marknaðarfortreytir. Ein bindandi játtan og/ella politisk ávirkan kann í slíkum førum gera tað ógjørligt ella sera trupult at virka eftir marknaðarfortreytum.

Samanumtikið kann sostatt sigast, at fyri at ein delegatión skal vera lóglig, er neyðugt,

- at delegatiónin verður givin við lóg,
- at talan er um serligar umstøður, har tað er natúrligt og har sera týdningarmiklar grundgevingar eru fyri, at fíggjarheimild verður delegerað,

- at tann, ið fær delegerað fíggjarheimild er óheftur av landsstýrinum,
- at løgtingið hevur veruligt eftirlit við tí virksemi, ið delegatiónin fevnir um.

Um fíggjarheimild skal delegerast, er avgerandi, at løgtingið hevur eitt veruligt eftirlit við tí virksemi, ið delegerað verður. Fyri at eftirlitið hjá tinginum skal verða veruligt, er avgerandi, at roknskaparviðurskiftini og grannskoðanarviðurskiftini lúka tey krøv, sum annars verða sett til landsstovnar. At ein týðandi partur av landsins virksemi liggur uttan fyri beinleiðis politiska ávirkan krevur harumframt, at viðurskiftini á hesum øki verða gjørd so greið sum gjørligt. Í lógini eigur klárt at verða ásett,

- at útreiðslur hjá grunninum ikki skulu takast við í fíggjar- ella játtanarlóg,
- at inntøkur ikki skulu takast við í fíggjarlóg (bert tá talan ikki er um skatt),
- at talan er um landsgrunn, sum er óheftur av beinleiðis ávirkan frá landsstýrinum,
- hvørjar avleiðingarnar verða, um delegatiónin verður tikin aftur, serstakliga viðvíkjandi ognini.

Í viðmerkingunum til uppskot til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum hevur í fleiri ár verið víst á, at tað er sera óheppið, at ein stórur partur av almennum virksemi liggur uttan fyri ávirkan løgtingsins. Samstundis hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at tað í ávísum førum møguliga er í stríð við stýrisskipanarlógina, at grunnar ikki verða tiknir við í fíggjarlóg. Hetta eigur at hava við sær, at grunnar, sum í dag eru uttan fyri fíggjarlógina og ávirkan løgtingsins, framyvir í størst møguligan mun verða tiknir við í fíggjarlógina.

**5. Tilknýti til landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti**

**1.** Stýrisskipanarlógin og løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald áseta, at alt virksemið hjá landsstýrinum og hjá øllum landsstovnum skal játtast á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, og at gerast skal ein samlaður landsroknskapur, sum fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins umframt aktiv og passiv.

Sambært stýrisskipanarlógini skulu løgtingsgrannskoðararnir, umframt árliga landsroknskapin, eisini fara ígjøgnum roknskapin hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap. Landsstýrinum er álagt at leggja hesar roknskapir fyri tingið til kunningar og at lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar at fara ígjøgnum og leggja fyri tingið til samtyktar. Tað er tó eingin greið lýsing av, hvørjir hesir almennu stovnar eru, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Ein røð av landsstovnum og -grunnum verða ikki tiknir við í landsroknskapin. Hetta merkir, at inntøkur og útreiðslur umframt aktiv og passiv hjá hesum stovnum/grunnum ikki verða tikin við í ein samlaðan landsroknskap. Harumframt verða roknskapirnir hjá fleiri landsgrunnum/-stovnum ikki lagdir fyri løgtingið.

***Galdandi lóggáva***

**2.** § 45, stk. 2, í stýrisskipanarlógini ásetir einki beinleiðis um, hvat verður roknað sum landsins útreiðslur ella inntøkur. Greinin er ein avskrift av grundlógarinnar § 47, stk. 2, og kemur í staðin fyri § 22 í gomlu stýrisskipanarlógini. At greinin kemur í staðin fyri § 22 í gomlu

stýrisskipanarlógini gevur einki tulkingarríkast. Meginreglan er, at landskassaroknskapurin skal fevna um allar inntøkur landsins og allar útreiðslur landsins.

Roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap, skulu verða lagdir fyri løgtingið í seinast lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Hesir roknskapir skula eisini latast løgtingsgrannskoðarunum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok. Tað er landsstýrið, ið skal leggja hesar roknskapir fyri tingið og løgtingsgannskoðararnar.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum hesar roknskapir og skula í seinast lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapunum saman við viðmerkingum sínum.

**3.** Lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m. ásetir nærri reglur fyri roknskaparviðurskiftum landsins. Lógin ásetir í § 1, stk. 1, at landsstýrið skal leggja fyri tingið ein samlaðan landsroknskap, sum skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins umframt aktiv og passiv landsins. Í § 1, stk. 2, er ásett, at landsroknskapurin í uppsetingini skal fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið. Henda áseting er ein neyvlýsing og uppískoyti til ásetingina í stýrisskipanarlógini § 45, stk. 2.

Reglurnar um roknskaparhald landsins fevna um alla landsumsitingina, allar stovnar v.m., hvørs rakstrarætlan er tikin við í játtanarlóg. Allir landsstovnar og landsgrunnar eru umfataðir av lóg um landsins almenna roknskaparhald. Tað merkir,

- at virksemið hjá landsstovnum og landsgrunnum skal takast við í landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár,
- at allar inntøkur og útreiðslur fyri farna fíggjarár, aktiv og passiv og broytingar hesum viðvíkjandi í árinum skulu takast við í tann *samlaða landsroknskapin*.

Eitt av høvuðsendamálunum við landsroknskapinum er at skráseta inntøkur og útreiðslur, sum løgtingið hevur heimilað í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Tí er umráðandi, at roknskapurin í uppsetingini av inntøkum og útreiðslum fylgir fíggjar- og eykajáttanarlógum.

Tann partur av *samlaða landsroknskapinum*, ið skrásetur inntøkur og útreiðslur hjá landskassanum, ið eru játtaðar í fíggjarlógini, kann síggjast sum ein *játtanarroknskapur*. Megingreglan er, at allar almennar inntøkur og allar almennar útreiðslur skulla skrásetast í játtanarroknskapinum. Um almennar inntøkur ella útreiðslur skullu haldast uttanfyri játtanarroknskapin, er neyðugt við delegatión av fíggjarheimild.

Tann *samlaði landsroknskapurin* kann tulkast sum ein staðfesting av øllum inntøkum og útreiðslum og allari ogn og skuld hjá landinum, íroknað allar stovnar og grunnar, har fíggjarheimild er delegerað.

Í teimum førum, har fíggjarheimild er delegerað, skula roknskapirnir verða lagdir fyri løgtingið. Í staðin fyri at leggja roknskapirnar hvør sær fyri løgtingið, eiga teir at verða tiknir við sum fylgiskjøl í landsroknskapinum. Fylgiskjølini eru her ein partur av tí *samlaða landsroknskapinum*. Hervið verða allir roknskapirnir viðvíkjandi landsvirkseminum lagdir fram í einum. Hetta vil lætta um arbeiðsgongdina í løgtinginum, samstundis sum yvirlitið yvir landsvirksemið verður betri.

Ein roknskapur skal geva eina rætta mynd av inntøkum, útreiðslum og fíggjarstøðu. Tí er av stórum týdningi, at roknskapirnir fyri landsvirksmið verða lagdir fram í einum. Ein ófullkomin uppgerð av landsins inntøkum, útreiðslum og fíggjarstøðu kann verða villleiðandi fyri løgtingið, og tí er aðalsetningurin, at alt landsvirksemi verður savnað í ein *samlaðan landsroknskap*.

**4.** Við heimild í § 3 í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m. hevur landsstýrið gjørt kunngerð, sum ásetir nærri reglur fyri roknskaparhald landsins. Henda kunngerð er galdandi fyri allar landsstovnar, t.e. allar landsstýrisdeildir, stovnar undir hesum, serligar grunnar o.a. umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á játtanarlóg javnbjóðis teimum rættiligu landsstovnunum.

Reglurnar kunnu eisini gerast galdandi fyri "ikki-landsstovnar", t.d. sjálvsognarstovnar, feløg, grunnar o.a., um so er, at landsstýrið avger, at so skal verða.

Meginreglan er, at allir landsstovnar, sum koma undir § 2, stk. 1, hava skyldu at nýta Búskaparskipan Landsins. Fíggjarmálastýrið kann loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir. Tað er tó ein treyt, at stovnar, ið ikki nýta Búskaparskipan Landsins, skulu nýta eina búskaparskipan, sum lýkur tey kunningar-, trygdar, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri Búskaparskipan Landsins.

**5.** § 45 í stýrisskipanarlógini ásetir reglur um landsroknskapin og grannskoðanina av hesum. Í § 45, stk. 4, verður ásett, at reglurnar í stk. 1-3 eisini verða nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap. Hetta er ein nýskapan í mun til gomlu stýrisskipaninarlógina, og slík áseting finnst ikki í grundlógini. Líknandi ásetingar vóru tó í §§ 2, 3 og 6 í Ll. 16/1965 um grannskoðan av landsins almennu roknskapum.

Ongin greið lýsing er av, hvørjir hesir almennu stovnar eru, sum hava sjálvstøðugan roknskap. Í viðmerkingunum í stýrisskipanarálitinum stendur einans, at: "reglurnar eisini eru galdandi fyri landsstovnar, sum hava sjálvstøðugan roknskap, t.d. telefonverkið, apotekið og rúsdrekkasølan".

Í § 4, stk. 1, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannkoðan av landskassaroknskapinum v.m. er ásett, at løgtingsgrannskoðararnir ganga ígjøgnum roknskapir hjá landsstovnum o.l., um hesir ikki eru við í landsroknskapinum. § 4, stk. 1, nr. 2 skal skiljast sum ein fyribils uppsamlingaráseting, sum tryggjar eftirlit við roknskapum hjá landsstovnum o.l., *sum eiga at vera við í landsroknskapinum*. "Arbeitt verður fram ímóti, at landsroknskapurin verður fullfíggjaður, og sum frálíður, eigur henda áseting at missa týdning sín."

Sambært § 4, stk. 2, skulu løgtingsgrannskoðararnir ansa eftir, at "allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg." Henda orðing er endurtøka av ásetingini í § 45, stk. 2, í stýrisskipanarlógini. Her er talan um játtanareftirlit, t.e. eftirlit við, at landsumsitingin heldur seg innan fyri tær játtanir, løgtingið hevur veitt í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Um tað er ásett í lóg, kunngerð e.l., útinna løggildigir ella skrásettir grannskoðarar grannskoðanina av roknskapum. Um einki er ásett um grannskoðan, so útinnir Landsgrannskoðanin grannskoðanina av roknskapum hjá landsstovnum o.l., um hesir ikki eru við í landsroknskapinum

### *Eftirlit við landsvirksemi*

**6.** Sambært stýrisskipanarlógini hevur løgtingið lóggávuvaldið, herundir valdið á fíggjarmálum landsins. Landsstýrið hevur útinnandi valdið. Løgtingið og løgtingsgrannskoðararnir hava eftirlitið við fyrisiting landsstýrisins, og roknskapir og frágreiðingar frá roknskapargrannskoðanini, herundir frágreiðingar um fyrisitingargrannskoðan eru ein liður í hesum eftirliti.

Tað avgerandi fyrilitið sambært stýrisskipanarlógini, tá talan er um almennar grunnar við sjálvstøðugum roknskapi, sum ikki verða tiknir við í landsroknskapin, er, at roknskapirnir verða lagdir fyri tingið. Hetta er ein bindandi stjórnarrættarlig áseting. Við hesi mannagong ber til hjá

tinginum at røkja sína eftirlitsskyldu og sín eftirlitsrætt. Eftirlitið verður tryggjað við serligum ásetingum í ymiskum lógum:

- stýrisskipanarlógini
- lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.
- kunngerð um roknskaparverk landsins o.a.
- lóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.
- delegatiónslógunum.

Landsstýrið hevur mett, at roknskapirnir fyri ávísar stovnar og grunnar skulu leggjast fyri løgtingsgrannskoðararnar. Løgtingsgrannskoðararnir hava hildið seg hava havt skyldu (og myndugleika) at gjøgnumganga roknskapirnar og leggja teir ein og ein fyri løgtingið til góðkenningar. Orsøkin er uttan iva, at talan er um roknskapir fyri virksemi, sum bæði landsstýrið og løgtingsgrannskoðararnir meta fevnir um "inntøkur/útreiðslur landsins", hóast virksemið hjá fleiri av hesum stovnum/grunnum ikki verður játtað á fíggjarlóg. Tað er tó ein røð av roknskapum hjá landsstovnum og -grunnum, ið ikki verða lagdir fyri løgtingið.

**7.** Tá talan er um eina lógliga delegatión av fíggjarheimild, kann alment virksemi haldast uttanfyri játtanarroknskapin. Tey fyrilit, ið liggja aftanfyri delegatiónina, eru ofta, at tørvur er at skilja politisku ávirkanina frá teirri fakligu útinnanini.

Spurningurin um óhefti frá poltiskari uppílegging í virksemið hjá grunnum og fíggjarligt óhefti hjá grunnum verður ofta misskiltur. Ein óheftur stovnur/grunnur kann ikki gera annað enn at fylgja lógini, hann virkar eftir. Um grunnurin verður tikin við á fíggjarlóg, hevur løgtingið ávirkan á teir fíggjarligu karmarnar, grunnurin virkar undir - men ikki á virksemið annars. Tað merkir, at virksemið hjá einum grunni kann vera óheft av beinleiðis politiskari ávirkan, hóast grunnurin verður tikin við á fíggjarlóg. Men at taka roknskapin hjá einum óheftum grunni við í landsroknskapin vil ikki ávirka óhefti. Her er bert talan um formlig roknskaparviðurskifti, ið einki hava at gera við virksemið, og sum kunnu verða við til at skapa størri gjøgnumskygni og betri yvirlit yvir landsvirksemið.

Í summum førum kann vera ynskiligt, at politiski myndugleikin ikki hevur ávirkan á dagliga virksemið. Men hetta er gjørligt, hóast virksemið verður tikið við á fíggjarlóg og landsroknskap. Sum dømi kann nevnast landsgrannskoðanin og løgtingsins umboðsmaður, sum eru óheftir í sínum virksemi, hóast teir eru við bæði í fíggjarlóg og landsroknskapi.

Tað eru týðandi búskaparlig áhugamál, ið kunna røkkast um landsvirksemi verður tikið við á fíggjarlóg og landsroknskap:

- Tess fleiri grunnar verða tiknir við í fíggarlóg, tess betri yvirlit fæst yvir ætlaða virksemið í einum komandi fíggjarári.
- Tess fleiri grunnur verða tiknir við í landsroknskapin, tess betri yvirlit fæst yvir búskaparliga virksemi landsins.

Fyri at roknskapirnir hjá landsstovnum og -grunnum skulu kunna haldast uttanfyri landsroknskapin, so er neyðugt við lógarheimild. Landsstovnar og -grunnar kunnu hava meiri ella minni tilknýti til landsroknskapin. Tílík lógarheimild eigur tískil eisini at áseta, hvussu tilknýtið til landsroknskapin skal verða.

Undir øllum umstøðum eigur eginogn/ogn og skuld hjá øllum landsstovnunum og -grunnunum at verða tikin við í landsroknskapin. Tá talan er um landsstovnar og -grunnar, er talan um ogn og skuld hjá landskassanum. Hóast tílíkir stovnar/grunnar ikki verða tiknir við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg, er einki, ið talar fyri, at ognirnar ikki verða tiknar við í landsroknskapin. Hetta vil hvørki ávirka virksemið ella óheftið hjá stovnunum/grunnunum.

Tá talan er um stovnar, ið hava fingið delegerað fíggjarheimild, ið er lóglig, er tað ein politiskur spurningur, hvussu tilknýtið til landsroknskapin skal verða. Tað er sostatt gjørligt, at virksemið hjá óheftum stovnum/grunnum verður tikið meiri ella minni við inn í landsroknskapin. Talan kann verða um at taka eginogn/ogn við undir ogn (Virðisbrøv), ella at partar av roknskapinum verða tiknir við í játtanarroknskapin. T.d. kunna rakstrarútreiðslur verða tiknar við í játtanarroknskapin, meðan annað virksemi verður hildið uttanfyri.

Um delegatiónslógin ikki hevur ásetingar um tilknýti til landsroknskap, má útgangsstøðið verða, at lóg um landsins almenna roknskaparhald er galdandi. Um delegatiónslógin harumframt ikke ásetir, at løggildir ella skrásettir grannskoðarar útinna grannskoðanina, skal Landsgrannskoðanin útinna grannskoðanina.

Um delegatiónin ásetir, at lógin um landsins almenna roknskaparhald v.m. og kunngerð um roknskaparverk landsins o.a. ikki skal verða galdandi fyri stovnin/grunnin, so er avgerandi neyðugt at áseta, hvørjar roknskaparreglur so eru galdandi. Tað kann tó tykjast løgið, um hesar reglur, ið eru galdandi fyri landsumsitingina annars, ikki skulu galda fyri einkultar grunnar. Um neyðugt er at gera umfatandi roknskaparreglur fyri einkultar stovnar/grunnar av nýggjum, má talan verða um týdningarmikil áhugamál, ið kunna rættvísgera eitt tílíkt arbeiði. Hetta serliga, tá roknskaparreglurnar longu eru gjørdar fyri restina av landsstovnunum og -grunnunum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava í fleiri ár í sínum viðmerkingum til landsroknskapin víst á tað óhepna í, at grunnar liggja uttanfyri landsroknskapin. Tá løgtingið góðkennir roknskapin, tekur tað samstundis undir við teimum viðmerkingum, sum fylgja roknskapinum. Sostatt kann sigast, at løgtingið ynskir, at ein so stórur partur av landsvirkseminum sum gjørligt, verður tikið við í landsroknskapin.

***Niðurstøða***

**8.** At løgtingsgrannskoðararnir og løgtingið ferð eftir ferð vísa á, at ynskiligt er, at ein størri partur av landsvirkseminum verður tikið við í landsroknskapin, eigur at hava við sær, at júst hetta verður gjørt.

Um fíggjarheimild verður delegerað er neyðugt, at løgtingið hevur eftirlit við virkseminum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Um staðfest verður, at ein delegatión av fíggjarheimild er lóglig, er helst talan um stovn/grunn, har tað er natúrligt og hóskandi, at roknskapurin verður hildin uttanfyri játtanarroknskapin. Fíggjarstøðan í landsroknskapinum eigur tó at fevna um eginogn/ogn og skuld hjá øllum

landsstovnum/landsgrunnum, sjálvt um virksemið annars liggur uttanfyri játtanarroknskapin. Harumframt eigur roknskapurin at verða tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin.

Um talan harafturímóti er um landsstovnar/-grunnar, har delegatiónin ikki er lóglig, og hesir ikki verða tiknir við í landsroknskapin, er talan um brot á galdandi reglur. Tvær loysnir eru á hesum trupulleika:

1. Er talan um landsvirksemi, har tað er natúrligt og hóskandi, at roknskapurin ikki verður tikin við í *játtanarroknskapin*, kann delegatiónin gerast lóglig. Lógin skal fastleggja tilknýtið til fíggjarlóg og landsroknskap. Samstundis er neyðugt, at roknskaparreglur, grannskoðanarreglur og eftirlit løgtingtingsins fylgja galdandi lógum.

2. Er talan um landsvirksemi, ið eigur at verða tikið við í játtanarroknskapin, er tað skylda hjá avvarðandi landsstýrismanni at fáa hesi viðurskifti í rættlag. T.e. at landsstovnar og –grunnar fylgja játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglunum.

## 6. Landsstovnar, landsgrunnar og grunnar

Niðanfyri er gjørt eitt yvirlit yvir landsstovnar/-grunnar, ið hava eina serstøðu játtanarliga og/ella roknskaparliga. Yvirlitið vísir, hvussu tilknýtið hjá hesum stovnum/grunnum í dag er til fíggjarlóg, landsroknskap og um roknskapirnir verða lagdir fyri løgtingið. Nakrir grunnar, sum ofta verða hildnir at vera landsgrunnar, eru eisini við. Greinarnar vísa, hvørji stýri vara av stovninum/grunninum.

| **Navn** | **Landsstovnur /-grunnur** | **§** | **Fíggjarlóg** | **Lands-roknskap** | **Lagdur fyri løgtingið** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. Húsalánsgrunnurin | Ja | 8 | Nei | Nei | Ja |
| 2. Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin | Ja | 8 | Nei | Nei | Ja |
| 3. Íbúðagrunnurin | Ja | 8 | Nei | Nei | Ja |
| 4. Apoteksgrunnurin | Ja | 8 | Ja **) | Ja *) | Ja *) |
| 5. Sjálvsognarstovnurin Sambýlir | Ja | 8 | Nei | Nei | Nei |
| 6. Føroya Realkreditstovnur | Ja | 3 | Nei | Nei | Nei |
| 7. Fíggingargrunnurin frá 1992 | Nei | 3 | Nei | Nei | Nei |
| 8. Landsbanki Føroya | Ja | 3 | Nei | Nei | Nei |
| 9. Íleggingargrunnurin | Nei | 3 | Nei | Nei | Ja |
| 10. Føroyagrunnurin frá 1971 | Nei | 3 | Nei | Nei | Nei |
| 11. Forskotsgrunnur fiskiflotans | Ja | 5 | Nei | Ja *) | Ja *) |
| 12. Búagrunnurin | Nei | 5 | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 13. Kommunali láni- og veðhaldsgrunnurin | Nei | 2 | Nei | Nei | Nei |
| 14. Grunnurin ætlaður brekaðum (Happadráttagrunnurin) | Ja | 10 | Ja **) | Ja *) | Ja *) |
| 15. Orðabókagrunnurin | Nei | 7 | Nei | Nei | Nei |
| 16. Mentannargrunnur Landsins | Ja | 7 | Ja **) | Ja *) | Ja *) |
| 17. Grunnurin Kikjubømúrurin | Nei | 7 | Nei | Ja *) | Ja *) |
| 18. Fróðskaparsetur Føroya, Sjálveigandi Stovnur | Ja | 7 | Ja **) | Ja **) | Ja **) |
| 19. Grannskingargrunnurin | Ja | 7 | Ja **) | - | - |
| 20. Endurgjaldsgrunnur Alivinnurnar | Ja | 6 | Nei | Ja *) | Ja *) |
| 21. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin | Ja | 6 | Nei | Nei | Nei |
| 22. Frítíðargrunnurin | Ja | 6 | Nei | Nei | Nei |
| 23. Arbeiðsloysistryggingin | Ja | 6 | Nei | Nei | Nei |
| 24. Framtaksgrunnurin | Nei | 6 | Nei | Nei | Nei |
| 25. Vinnuframagrunnurin | Ja | 6 | Ja | Ja | - |
| 26. Jarðargrunnurin | Ja | 6 | Nei | Nei | Ja |
| 27. Grunnurin fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu | Ja | 6 | Nei | Nei | Ja |
| 28. Jólamerkjagrunnurin | Ja | 6 | Nei | Nei | Nei |

*) Tiknir við sum fylgiskjal til landsroknskapin.
**) Verða partvíst tiknir við.

---

**Fylgiskjal 1**

## Húsalánsgrunnurin

### Navn
Húsalánsgrunnurin.

### Endamál
Endamálið er at veita lán til sethús- og íbúðabygging og keyp. (§ 1)

### Stovnan
Grunnurin varð stovnaður við lóg nr. 49 frá 30. mai. 1964.
Stovnsfæið kom úr landskassanum.
Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunnin o.a.

**Leiðsla**
Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir. (§ 3)
Landsstýrismaðurin tilnevnir tiltakslimir. (§ 3)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýriðsmaðurin setur stýrið. (§ 3)
Landsstýrismaðurin ásetir eftir uppskoti frá stýrinum nærri reglur í kunngerð um treytir fyri lánsveiting. (§ 6)
Grunnurin er undir eftirliti landsstýrismansins. (§ 2)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Løgtingsgrannskoðararnir leggja roknskapin fyri løgtingið til samtyktar.
Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.
Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.
Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Løgtingið kann broyta virksemi grunnsins, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**
Húsalánsgrunnurin er landsstovnur, og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Grunnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað í fíggjarlóg ella eigur lógin fyri húsalánsgrunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Húsalánsgrunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapinum.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**

Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara. (§ 31, stk. 2). Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins. (§ 31, stk. 3)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 2

## Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin

**Navn**
Bjálvingarstuðulsgrunnurin.

**Endamál**
Endamál grunsins er at veita stuðulslán til bjálving og orkusparandi tiltøk til njótandi avlamis-, einkjufólk- og fólkapensjónistar, sum búgva í egnum húsum ella íbúð.

**Stovnan**
Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 87 frá 1. juni 1982.
Stovnsfæið kom úr landskassanum
Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um húsalánsgrunn o.a.

**Leiðsla**
Húsalánsgrunnurin og stýrið fyri húsalánsgrunnin um- og fyrisitur Bjálvingarstuðulsgrunnin. (§ 7)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrismaðurin setur stýrið. (§ 3)
Landsstýrismaðurin ásetir eftir uppskoti frá stýrinum nærri reglur í kunngerð um treytir fyri lánsveiting. (§ 6)
Grunnurin er undir eftirliti landsstýrismansins. (§ 2)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Løgtingsgrannskoðararnir leggja roknskapin fyri løgtingið til samtyktar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Løgtingið kann broyta virksemi hjá grunninum, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**
Bjálvingarstuðulsgrunnurin er landsgrunnur, umsitin av einum øðrum landsgrunni.
Bjálvingarstuðulsgrunnurin er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Grunnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað í fíggjarlóg ella eigur lógin fyri húsalánsgrunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá bjálvingarstuðulsgrunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Bjálvingarstuðulsgrunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapinum.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara. (§ 31, stk. 2). Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins. (§ 31, stk. 3)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannkoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 3

## Íbúðagrunnurin

**Navn**
Íbúðagrunnurin.

**Endamál**
Endamál grunsins er at fremja og stuðla kommunum, feløgum og stovnum at útvega og reka íbúðahús. (§ 16)

**Stovnan**
Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 100 frá 1. desember 1978.
Stovnsfæið kom úr landskassanum.

Grunnurin varð avtikin við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992.
Grunnurin varð endurstovnaður við løgtingslóg nr. 65 frá 13. juni 1995.
Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um húsalánsgrunn o.a.

**Leiðsla**
Húsalánsgrunnurin og stýrið fyri húsalánsgrunnin um- og fyrisitur Íbúðagrunnin. (§ 7)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrismaðurin setur stýrið. (§ 3)
Landsstýrismaðurin ásetir eftir uppskoti frá stýrinum nærri reglur í kunngerð um treytir fyri lánsveiting. (§ 6)
Grunnurin er undir eftirliti landsstýrismansins. (§ 2)
Landsstýrismaðurin ásetur eftir uppskoti frá stýrinum reglur viðvíkjandi eginpeningi, lánsupphædd og afturgjaldingartreytum. (§ 24, stk. 3)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Løgtingsgrannskoðararnir leggja roknskapin fyri løgtingið til samtyktar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Løgtingið kann broyta virksemið fyri grunnin, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**
Íbúðagrunnurin er landsgrunnur, umsitin av einum øðrum landsgrunni. Íbúðagrunnurin er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Grunnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað í fíggjarlóg ella eigur lógin fyri húsalánsgrunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetur, at virksemið hjá íbúðagrunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlógina.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Grunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetur, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum

frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara. (§ 31, stk. 2). Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins. (§ 31, stk. 3)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannkoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 4

## Apoteksgrunnurin

**Navn**
Apoteksgrunnurin.

**Endamál**
Apoteksgrunnurin hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið. (§ 23)

**Stovnan**
Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 14 frá 28. mars 1949.
Stovnsfæið var peningurin, sum varð lutaður Føroyum úr ríkisins apotekaragrunni. Harumframt eigur grunnurin tær vørur á goymslu, ið apoteksraksturin á føroyskum hondum, eftir nærri ásetan, byrjar við og tær føstu ognir, grunnurin keypir ella ognar sær. Apoteksgrunnurin eigur avlopið, sum apoteksraksturin í Føroyum gevur, og hevur annars við landskassanum aftanfyri sær fíggjarliga ábyrgd av apotekinum.
Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum seinast broytt við kunngerð nr. 17 frá 28. februar 1996.

**Leiðsla**
Apoteksgrunnurin er undir landsstýrinum. (§ 23)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrið hevur beinleiðis ávirkan á grunnin.

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Løgtingsgrannskoðararnir leggja roknskapin fyri løgtingið til samtyktar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Løgtingið kann broyta virksemið fyri grunnin, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**
Apoteksgrunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Grunnurin verður tikin við í fíggjarlóg sum partur av apoteksverkinum frá 2000.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Grunnurin verður tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin. Grunnurin hevur ikki fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs., at grunnurin eigur at verða tikin við í játtanarroknskapin og ikki bert sum eitt fylgiskjal til landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Landsapotekarin og hvørt apotek sær hava hvør sín roknskap, sum verður grannskoðaður av ríkisgóðkendum grannskoðara og síðan góðkendur eftir reglunum um almennan roknskap. (§ 22, stk. 2)
Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannkoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 5

## Sjálvsognarstovnurin Sambýlir

**Navn**
Sjálvsognarstovnurin Sambýlir

**Endamál**
Endamál stovnsins er at eiga og reka so bíliga sum tilber ognir/sambýlir, sum skulu nýtast til bústað til brekað fólk. (§ 1, stk. 3)

**Stovnan**
Stovnurin Sambýlir varð settur á stovn av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum.

Stovnsfæið, ið varð játtað á eykajáttanarløgtingslóg fyri 1998, er 3,9 mio. kr.
Grunnurin er ein landsstovnur.

**Lóggáva**
Eingin.
Stovnurin virkar sambært viðtøkum frá 1. januar 2000.

**Leiðsla**
Leiðsla stovnsins er ein nevnd, sum telur 3 limir. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum velur allar limirnar, umframt ein varalim fyri hvønn limin. (§ 4, stk. 1)
Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum skipar nevndina. (§ 4, stk. 3)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum velur allar limirnar, umframt ein varalim fyri hvønn limin. (§ 4, stk. 1)
Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum skipar nevndina. (§ 4, stk. 3)
Viðtøkubroytingar skulu góðkennast av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum. (§ 12)
Stovnurin kann bert avtakast, um landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum skrivliga hevur boðað frá, at tikið verður undir við avgerðini. (§ 13)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Roknskapurin fyri stovnin verður ikki lagdur fyri løgtingið til góðkenningar.
Tá talan er um landsstovn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.
Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.
Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Til at samtykkja avgerðir um broyting í viðtøkum krevst full semja í nevndini, eins og viðtøkubroytingar skulu góðkennast av landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum. (§ 12)
Stovnurin kann bert avtakast, um nevndin einmælt samtykkir hetta, og landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum skrivliga hevur boðað frá, at tikið verður undir við avgerðini. (§ 13)
Verður stovnurin avtikin, verður vald ein trýmanna avtøkunevnd til at taka sær av øllum viðurskiftum í sambandi við avtøkuna. Ein av nevndarlimunum skal vera løgfrøðingur. (§ 13, stk. 2)
Verður stovnurin avtikin, verða allar ognir stovnsins seldar best møguligt. Eftir at skuld stovnsins er goldin, verður tað, sum eftir er, goldið til stovnaran. Stovnarin skal nýta avlopið til sama endamál, t.v.s. til bústað til brekað fólk. (§ 13, stk. 3)
Landsstýrið kann tó ikki taka avgerð um ognirnar uttan fyrst at spyrja løgtingið eftir, sí stýrisskipanarlógin § 43, 2. stk.
Fæið kann flytast aftur til stovnaran. Samstundis kunna viðtøkurnar verða broyttar, soleiðis at reglur um avtøku og endamál kunnu verða broyttar. Talan er tískil ikki um ein sjálvsognarstovn, men um ein vanligan landsstovn.

**Ognarviðurskifti**
Sambært § 1, stk. 4 er stovnurin ein sjálvsognarstovnur. Henda áseting hevur ongan sjálvstøðugan týdning. At ognir stovnsins kunna flytast aftur til stovnaran, og at stovnarin hevur stóra ávirkan á

leiðsluna og skal góðkenna allar viðtøkubroytingar ger, at talan ikki er um ein sjálvsognarstovn. Stovnurin er ein landsgrunnur, og er sostatt ogn landskassans.
Ásetingarnar í §§ 12-13 í viðtøkunum, hava onga ávirkan á ognartilknýtið.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Virksemið hjá stovninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Sostatt eigur virksemið at verða tikið við á fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Roknskapurin hjá stovninum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Sostatt eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin á sama hátt sum aðrir landsstovnar.
Stovnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Stovnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Stovnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapur stovnsins skal á hvørjum ári grannskoðast av einum lóggildum grannskoðara, sum á aðalfundinum á hvørjum ári verður valdur av nevndini. (§ 11)

Talan er um ein landsstovn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannkoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 6

## Føroya Realkreditstovnur

**Navn**
Føroya Realkreditstovnur (Realurin). (§ 1)

**Endamál**
Endamál stovnsins er at veita lán við veð í fiskiførum, flótandi eindum og førum í frálandsvinnu og fiskaaling við heimstaði í Føroyum (§ 1).

**Stovnan**
Realurin varð stovnaður við fólkatingslóg nr. 60 frá 12. mars 1955. Stovningarfæið var 10 mio. kr., sum varð fingið til vega sambært lóg nr. 209 frá 7. juni 1952 og kom frá danska ríkiskassanum. Realurin varð yvirtikin 1. januar 1999, sí avtalu millum donsku stjørnina og føroyska landsstýrið frá 10. juni 1998, artikul 6. Realurin heldur fram sum føroyskur stovnur undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum, sí lóg nr. 75 frá 5 novembur 1998 um Føroya Realkreditstovn §§ 1 og 2, stk. 1, 4. pkt.
Realurin er ein landsstovnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn.

**Leiðsla**
Realurin verður stjórnaður av einari trímannanevnd, ið verður tilnevnd av landsstýrismanninum. (§ 2).
Stjórnin ábyrgist mótvegis landsstýrismanninum fyri leiðsluni av stovninum. (§ 2).
Stjórnin setir starvsfólk, herundir møguligan undirstjóra, og metingarmenn. Landsstýrismaðurin skal kunnast um útnevning av undirstjóra og metingarmonnum. (§ 2, stk. 2)
Landsstýrismaðurin ger eftir tilmæli frá stjórnini viðtøkur fyri stovnin. (§ 4)
Um stjórar, undirstjórar og metingarmenn ikki kunnu taka avgerð vegna ógegni, tekur landsstýrismaðurin avgerð um lánveiting. (§ 5, stk. 1-2)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
§ 1 ásetur, at Realurin er sjálvsognarstovnur. Henda áseting hevur ongan sjálvstøðugan týdning. Fyri at talan skal verða um ein sjálvsognarstovn, skal hesin hava ávís eyðkenni. Hetta verður nærri viðgjørt í álitinum. Realurin lýkur ikki treytirnar fyri at vera ein sjálvsognarstovnur ella grunnur í løgfrøðiligari merking.
Landsstýrismaðurin hevur møguleika fyri at hava ávirkan á virksemið hjá Realinum. Hann setur stjórnina og ger viðtøkur fyri stovnin. Landsstýrismaðurin er ikki bundin av tilmælinum frá stjórnini. Stovnurin er óheftur av beinleiðis ávirkan frá landstýrismanninum.
Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum. Landsstýrismaðurin tilnevnir grannskoðara at hava eftirlit við stovninum, umframt at landsstýrismaðurin ger reglugerð fyri hetta eftirlit (§ 13).

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Roknskapurin fyri Realin verður ikki lagdur fyri løgtingið.
Tá talan er um landsstovn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.
Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.
Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Realurin er stovnaður við lóg, og løgtingið kann til eina og hvørja tíð broyta lógina. Um stovnurin verður avtikin, verður við løgtingslóg tikin avgerð um, hvat ognir stovnsins skulu brúkast til (§ 17).

**Ognarviðurskifti**
Realurin er landsstovnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Virksemið hjá Realinum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella játtanarlóg. Lógin um Realin gevur onga heimild at halda stovnin uttanfyri fíggjar- ella játtanarlóg. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg ella eigur lógin fyri Realin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá stovninum skal haldast uttanfyri fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Roknskapurin hjá Realinum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.
Realurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Realurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Realurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Ársroknskapurin verður grannskoðaður av einum ríkisgóðkendum grannskoðara, valdum av stjórnini. (§ 15 í løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998).
Talan er um ein landsstovn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Løgtingsgrannkoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 7

## Fíggingargrunnurin frá 1992

**Navn**
Fíggingargrunnurin frá 1992.

**Endamál**
"Fonden har til formål at indskyde og besidde ejerkapital i P/F Føroya Banki, Tórshavn, reg. nr. P/F 10, i form af aktiekapital eller ansvarlig kapital", sí § 2 í viðtøkunum fyri fíggingargrunnin frá 1992, soleiðis sum tær vórðu broyttar í 1998.

**Stovnan**
Fíggingargrunnurin varð stovnaður 2. novembur 1992 við avtalu millum føroyska landsstýrið og donsku stjórnina.
Stovningarfæið, ið var 300 mio. kr., kom frá landsstýrinum, sí § 3 í viðtøkunum fyri fíggingargrunnin. Harumframt vórðu 200 mio. kr. tilførdar grunninum úr íleggingargrunninum, sum lánsfæ við ábyrgd.
Fíggingargrunnurin er ein landsgrunnur við eini serstøðu.

**Lóggáva**
Grunnurin virkar eftir lóg um vinnurekandi grunnar, Anordning nr. 247 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde. Harumframt er fólkatingslóg nr. 462 frá 12. juni 1996 galdandi fyri grunnin.
Hóast Fíggingargrunnurin hevur eyðkenni, ið ger, at hann ikki er ein grunnur í løgfrøðiligari merking, so eru ymisk viðurskifti (moment), ið gera hansara støðu serliga.

- Grunnurin er ikki stovnaður við lóg. Talan er um eina lóg, sum einans ásetir, at fæið og avlopið í grunninum kann førast aftur til landsstýrið (stovnaran).

- Viðmerkingarnar til lógina vísa á, at talan er um ein serligan grunn, har vanligu atlitini til ognarar ikki gera seg galdandi.

- Landsstýrið kann ikki gera nakað av sínum eintingum. Allar avgerðir verða tiknar av stýrinum fyri grunnin. Nakrar avgerðir skulu tó góðkennast av landsstýrinum.

- Grunnurin hevur fingið loyvi at virka sum vinnurekandi grunnur.

Virksemið verður stýrt sambært viðtøkum frá 1998.

**Leiðsla**
Grunnurin verður stjórnaður av eini nevnd, ið telur ein formann og 4 aðrar nevndarlimir. Landsstýrið setir formannin og 3 nevndarlimir. Hesir 4 nevndarlimir tilnevna í semju tann fimta nevndarlimin.
Avgerðir hjá nevndini eru endaligar, § 5, stk. 2 í viðtøkunum.

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrið velur 4 av 5 nevndarlimum.
Landsstýrið skal góðkenna avgerðir um:

1. "at stemme for nedskrivning af de af fonden ejede kapitalandele, jf. § 2, stk. 1, nr. 1 og
2. hel eller delvis afhændelse af aktiekapital eller ansvarlig kapital".

Landsstýrið hevur annars ikki ávirkan á virksemið hjá grunninum.

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ikki ávirkan á virksemið hjá grunninum.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Nevndin í grunninum kann við vanligum meiriluta taka avgerð um broyting av viðtøkum og avgerð um avtøku av grunninum.
Broytingar av viðtøkum fyri grunnin kunnu bert gerast sambært „anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde" nr. 247 frá 2. mai 1993. Lógin ásetir soleiðis:

- "Efter indstilling fra bestyrelsen og med justitsministerens samtykke kan fondsmyndigheden tillade, at en bestemmelse i en vedtægt ændres. Det kan herunder tillades, at fonden sammenlægges med andre erhvervsdrivende fonde eller opløses." (§ 48)

Broytingar í viðtøkum kunnu sostatt bert gerast av nevndini eftir samtykt frá danska løgmálaráðharranum, um so er at "fondsmyndigheden" loyvir tí. "Fondsmyndigheden" er í hesum føri danska ídnaðarmálaráðið ella løgmálaráðið, sí § 57. Hetta er eisini galdandi fyri avtøku av grunninum. Broyting av viðtøkunum krevur harumframt góðkenning frá Føroya Landsstýri, sí § 13 í viðtøkunum.

**Ognarviðurskifti**
Grunnurin virkar eftir lóg um vinnurekandi grunnar. Hann hevur tó ta serstøðu, at heimild er givin við lóg til, at fæið verður lutað út til landsstýrið:

- "Det kan ved vedtægtsændring for Finansieringsfonden af 1992 bestemmes, at fonden kan uddele midler til Færøernes Landsstyre, når midlerne hidrører fra datterselskaber eller er fremkommet som led i nedsættelse af fondens grundkapital eller som led i uddeling af fondens egenkapital i øvrigt. Det kan endvidere ved vedtægtsændring for Finansieringsfonden af 1992 bestemmes, at fondens nettooverskud ved opløsning kan uddeles til Færøernes landsstyre", sí fólkatingslóg nr. 462 frá 12. juni 1996.

Hesar avgerðir kunna bert takast av nevndini fyri grunninum. Ein grundleggandi treyt fyri, at talan er um ein grunn í løgfrøðiligari merking, er, at ognirnar ikki kunnu flytast aftur til stovnaran. Tá henda treyt ikki er lokin í Fíggingargrunninum, kann grunnurin ikki metast sum ein grunnur í løgfrøðiligari merking. At grunnurin er skrásettur merkir, at hann virkar eftir lóg um vinnurekandi grunnar, men hann verður av hesi orsøk ikki ein grunnur í løgfrøðiligari merking.

Tórshavn, reg. nr. P/F 10, i form af aktiekapital eller ansvarlig kapital." Í § 10, stk. 1 er ásett at: "Fondens midler skal anvendes i overenstemmelse med fondes formål". Tá broyting í viðtøkunum krevur góðkenning frá Føroya Landsstýri, kann grunnurin ikki gera annað enn fylgja endamálinum ella ásetingunum í § 10, stk. 2 og § 11.

- § 10, stk. 2 ásetir, at: "Fondens bestyrelse kan beslutte at uddele midler til Færøernes Landsstyre, jf. lov 462 af 12. juni 1996, når midlerne hidrører fra datterselskaber eller er fremkommet som led i nedsættelse af grundkapitalen eller som led i uddeling af fondens egenkapital i øvrigt".
- § 11 ásetir at: "Fondens bestyrelse kann beslutte, at fondens nettooverskud uddeles til Færøernes Landsstyre ved opløsning af fonden[…]"

Sambært viðtøkunum kunnu miðlar bert lutast út til landsstýrið. Tá ein broyting av viðtøkunum krevur góðkenning frá landsstýrinum kann sigast, at talan er um eitt "ognartilknýti" til landskassan. Eftir lógini og viðtøkunum kann hetta "ognartilknýtið" ikki broytast, uttan at landsstýrið loyvir hesum.

**Tilknýtið til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Virksemið hjá Fíggingargrunninum frá 1992 er ikki virksemi hjá landinum. Virksemið skal tí ikki við í fíggjarlóg.

**Tilknýtið til landsroknskap**
Fíggingargrunnurin frá 1992 verður tikin við undir "Virðisbrøv" í landsroknskapinum. Tá talan er um eitt "ognartilknýti" til landskassan, gevur hetta eina rættvísandi mynd av landsroknskapinum.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Grunnurin verður grannskoðaður av tveimum grannskoðarum, sum verða valdir av nevndini. Tann eini grannskoðarin skal verða ríkisgóðkendur, sí § 12 í viðtøkunum.

---

## Fylgiskjal 8

## Landsbanki Føroya

**Navn**
Landsbanki Føroya.

**Endamál**
Landsbanki Føroya hevur sum almennur banki til uppgávu at verða við til at røkja samfelagslig áhugamál við tí í hyggju at varðveita trygg fíggjarviðurskifti í Føroyum og eina javna útbygging av føroyska samfelagnum (§ 1).

**Stovnan**
Landsbankin varð stovnaður tann 2. oktober 1978 við lóg nr. 57. Stovnsfæ bankans kom úr landskassanum.
Landsbankin er ein landsstovnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya, sum seinast broytt við Ll. 86/2000.
Kunngerð nr. 150 frá 22. oktober 1992 um viðtøkur fyri Landsbanka Føroya.

**Leiðsla**
Bankin er undir leiðslu av einum umsjónarráði, einari nevnd og einari stjórn (§ 4). Umsjónarráðið telur 11 limir, sum eru:

1. 5 limir valdir av Føroya Landsstýri, eftir tilmæli frá Búskaparráðnum.
2. 6 limir valdir av vinnufeløgum. Teir skulu hava hollan kunnleika til vinnuviðurskifti. Hesir kunnu ikki vera tinglimir. Teir skulu umboða vinnuna og tey, ið starvast í henni á fjølbroyttan hátt (§ 4, stk. 1-2).

Nevndin telur 5 limir, sum eru:

1. 2 limir valdir av Føroya Landsstýri eftir tilmæli frá Búskaparráðnum (§, 4. stk. 3, litra a)
2. 3 limir valdur av umsjónarráðnum við vanligum meiriluta (§ 4, stk. 3, litra b)

Við tilmæli frá nevndini setur landsstýrið stjóra bankans, eftir at málið er lagt fyri umsjónarráðið (§ 4, stk. 4).

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrið ger viðtøkur fyri bankan. Broytingar í viðtøkunum kunnu verða gjørdar eftir tilmæli frá nevndini og stjórnini aftaná ummæli frá umsjónarráðnum. (§ 5)
Landsstýrið hevur eftirlit við, at bankin lýkur skyldur sínar sambært lógini og viðtøkunum. (§ 4, stk. 5)
Landsstýrið velur 5 limir í umsjónarráðið (§ 4, stk. 2, litra a).
Landsstýrið velur 2 limir í nevndina (§ 4, stk. 3, litra a)
Við tilmæli frá nevndini setur landsstýrið stjóra bankans, eftir at málið er lagt fyri umsjónarráðið.

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Roknskapurin fyri Landsbankan verður ikki lagdur fyri løgtingið.
Tá talan er um landsstovn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.
Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.
Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Løgtingið kann broyta virksemið hjá landsbankananum, herundir taka landsbankan av.

**Ognarviðurskifti**
Landsbankin er landsstovnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Virksemi bankans verður ikki játtað í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur lógin fyri landsbankan at verða broytt soleiðis, at hon ásetir, at virksemið hjá bankanum skal haldast uttan fyri fíggjarlógina, ella eigur virksemið at verða játtað í fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Landsbankin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum ella eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Landsbankin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Landsbankin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Landsbankin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá auguast 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapur bankans skal grannskoðast av løggildum grannskoðara, sum umsjónarráðið velur. (§ 18)

Talan er um ein landsstovn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannkoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 9

## Íleggingargrunnurin

**Navn**
Investeringsfond for Færøerne (Íleggingargrunnurin).

**Endamál**
Endamálið er fyrst og fremst at veita lán til íløgur í størri almennar løgur og líknandi, ið mugu metast sum neyðugar ella ynskiligar fyri menningini hjá føroyska vinnulívinum, og har nøktandi fígging ikki kann fáast aðrastaðni (§ 3).

Av innkomnum rentum og avdrøgum kann harumframt veitast lán til privat vinnuvirki og samtøk av vinnuvirkjum ella felagskapum við almannagagnligum endamálum, har tað ikki kann fáast nøktandi fígging aðrastani, og har endamálið má metast at koma føroyskum vinnulívi sum heild at gagni (§ 3, stk. 2).

**Stovnan**
Grunnurin var stovnaður við fólkatingslóg nr. 28 frá 29. januar 1964 om en invetseringsfond for Færøerne, sum seinast broytt við fólkatingslóg nr. 566 frá 16. november 1977.
Stovningarfæið kom úr danska ríkiskassanum (§ 1, stk. 2-3)
Íleggingargrunnurin er ein danskur landsgrunnur.

**Lóggáva**
Lóg nr. 28 frá 29. januar 1964 om en invetseringsfond for Færøerne, sum seinast broytt við lóg nr. 566 frá 16. november 1977.
Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri virksemið hjá grunninum (§ 3, stk. 3). Hetta er gjørt í kunngerð nr. 119 frá 23. oktober 1996 um virksemið hjá íleggingargrunninum fyri Føroyar.

**Leiðsla**
Grunnurin verður stýrdur av einum 5 manna stýri, sum verður sett av landsstýrinum (§ 2 í lógini og § 2 í kunngerðini). Stýrið er hægsti myndugleiki grunsins (§ 2 í kunngerð)
Avgerðir stýrisins um lánsveitingar og treytirnar fyri teimum eru endaligar. (§ 4 í kunngerðini)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrið setir stýrið. (§ 2 í lógini)
Landsstýrið ger nærri reglur fyri virksemið hjá grunninum. (§ 3, stk. 3 í lógini)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ikki ávirkan á virksemið hjá grunninum.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Roknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar. Talan er um ein danskan landsgrunn, sum hevur tættast tilknýti til danska statskassan. Tískil er ikki neyðugt, at roknskapurin verður lagdur fyri tingið.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Eftir upprunalógini góðkennir statsministarin viðtøkurnar, eftir at hava fingið viðmerkingar frá føroyska heimastýrinum (§ 2, stk. 4 í upprunalógini). Henda áseting verður broytt við lóg nr. 566 frá 16. november 1977. Hereftir er tað landsstýrið, sum ger nærri reglur fyri virksemið hjá grunninum.

Í viðmerkingunum til upprunalógina stendur m.a.: "I fondens vedtægter vil blive optaget bestemmelser om nærmere retningslinier for udlån, herunder regler om bestyrelsesmedlemmernes kompetence i forbindelse med afgivelse af lånetilsagn, ligesom der vil blive givet regler om regnskab og revision, om medhjælp for bestyrelsen samt om forholdene ved fondens eventuelle ophør."

Landsstýrið hevur sostatt ávirkan á virksemið í grunninum, men bert innan karmarnar á lógini. Grunnurin kann bert takast av við fólkatingslóg. Fólkatingið ger tá av, hvat skal henda við ognini.

**Ognarviðurskifti**
Fólkatingið ger av, hvat skal henda við ognini, um grunnurin verður tikin av. Grunnurin er sostatt partur av danska statskassanum.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Íleggingargrunnurin hevir einki tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Talan er um ein danskan landsgrunn, og tískil skal hann ikki við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

**Tilknýti til landsroknskap**
Íleggingargrunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Talan er um ein danskan landsgrunn, og eigur hann tí ikki at verða tikin við í landsroknskapin.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Bókhald grunsins verður umsitið av Føroya Gjaldstovu. (§ 8)
Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildigum grannskoðara. Grannskoðaði roknskapurin verður sendur landsstýrismanninum til góðkenningar og harnæst forsætismálaráðnum til kunningar. (§ 9, stk. 3-4)

---

## Fylgiskjal 10

## Føroyagrunnurin frá 1971

**Navn**
Føroyagrunnurin frá 1971.

**Endamál**
Endamál grunsins er sambært § 3 í viðtøkunum:

a. At eiga partapening í P/F J. F. K. Trol

b. Í tann mun fíggjarligu umstøður grunsins loyva tí at veita stuðul sambært § 4 í viðtøkunum.

c. Harumframt kann grunnurin seta á stovn og eiga vinnurekandi partafeløg.

Í § 4 verður ásett, at tað nettoavlop, eftir at rakstrarútreiðslur, sum peningur stovnsins kastar av sær, kann verða nýtt til:

a. Vinnuútbúgving hjá ungum føroyingum til stuðul og/ella til ídnaðarroyndir innan fiskivinnuna, handverk og ídnað, marknaðarkanningar og slíkt.

b. Nevndin kann gera hóskandi avleggingar til øking av stovnsfæi grunnsins.

**Stovnan**
Føroyagrunnurin var stovnaður við kunngerð nr. 2 frá 27. januar 1972. Danski tjóðbankin hevur latið grunninum peningin. Stovnsfæ grunnsins er C-partabrøv áljóðandi 7 mill. kr. í P/F J.F. Kjølbro (nú J.F.K. Trol). (§ 1 í viðtøkunum frá 11. februar 2000)
Føroyagrunnurin er ein sjálvsognarstovnur.

**Lóggáva**
Grunnurin virkar sum vinnurekandi grunnur eftir „anordning om ikraftræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde" nr. 247 frá 2. mai 1993.
Virksemið verður stýrt sambært viðtøkum frá 11. februar 2000.

**Leiðsla**
Leiðsla grunnsins er eitt stýrið við 4 limum, sum skulu verða búsitandi í Føroyum. Stýrislimirnir verða útnevndir fyri 8 ár.
Tríggir av stýrislimumnum verða útnevndir av Føroya Landsstýrið, tó soleiðis at ein av hesum verður útnevndur eftir tilmæli frá Klaksvíkar kommunu. Fjórði stýrislimurin verður útnevndur av Klaksvíkar kommunu eftir tilmæli frá teimum verkafeløgum, sum umboða tey starvssettu í JFK koncernini. (§ 6)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Tríggir av stýrislimumnum verða útnevndir av Føroya Landsstýrið, tó soleiðis at ein av hesum verður útnevndur eftir tilmæli frá Klaksvíkar kommunu.

Broytingar í viðtøkunum hjá døttirfeløgum grunnsins kunnu ikki gerast uttan góðkenning frá Føroya Landsstýrið (§ 7).
Stýrið leggur árliga frágreiðing og roknskap fyri landsstýrið. (§9, stk. 3)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur onga ávirkan á grunnin.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Broyting av viðtøkum fyri grunninum kunnu bert gerast sambært „anordning om ikraftræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde" nr. 247 frá 2. mai 1993. Lógin ásetur soleiðis:

- "Efter indstilling fra bestyrelsen og med justitsministerens samtykke kan fondsmyndigheden tillade, at en bestemmelse i en vedtægt ændres. Det kan herunder tillades, at fonden sammenlægges med andre erhvervsdrivende fonde eller opløses." (§ 48)

Broytingar í viðtøkum kunnu sostatt bert gerast av nevndini eftir samtykki frá danska løgmálaráðharranum, um so er at "fondsmyndigheden" loyvir tí. "Fondsmyndigheden" er í hesum føri danska ídnaðarmálaráðið ella løgmálaráðið, sí § 57. Hetta er eisini galdandi viðvíkjandi avtøku av grunninum.
Verður grunnurin avtikin, krevst somuleiðis innstilling frá landsstýrinum. (§ 11 í viðtøkunum)

**Ognarviðurskifti**
Verður grunnurin avtikin, verður nettoognin nýtt samsvarandi avgerð frá stýrinum og tess innstilling til grunsmyndugleikan, soleiðis at ognin í størst møguligan mun verður nýtt í samsvar við endamálsgrein grunsins. (§ 10 í viðtøkunum).
Her er talan um ein veruligan sjálvsognarstovn, t.e. ein, ið eigur seg sjálvan. Grunnurin hevur einki tilknýti til landskassan.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Føroyagrunnurin hevur einki tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Talan er ikki um ein landsgrunn, og tískil skal hann ikki við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Føroyagrunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Talan er um ein sjálvsognarstovn, og eigur hann tí ikki at verða tikin við í landsroknskapin.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapur grunsins skal grannskoðast av einum av stýrinum valdum grannskoðara, ið skal verða ríkisviðurkendur. (§ 9, stk. 2)

---

## Fylgiskjal 11

## Forskotsgrunnur Fiskiflotans

**Navn**
Forskotsgrunnur Fiskiflotans.

**Endamál**
Endamálið er at veita forskot til fiskimenn við bústaði í Føroyum, og sum eru mynstraðir við fiskiskipi, skrásett í Føroyum. (§ 1)

**Stovnan**
Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 71 frá 23. mai 1997 um Forskotsgrunn Fiskiflotans.

Stovnsfæ grunsins uppá 18.000.000,00 kr. kom úr landskassanum, partvíst sum eykajáttan og partvíst við yvirtøku av útistandandi forskotspeningi hjá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna. (§ 2)
Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 74 frá 5. mars 1997 um Forskotsgrunn Fiskiflotans, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 62 frá 27. apríl 2001.

**Leiðsla**
Fyri grunnin situr ein nevnd við 3 limum, ið verða valdir soleiðis:

- Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim

Motorpassarafelag velja í felag 1 lim

- Føroya Reiðarafelag velur 1 lim (§ 3)

Nevndin ger viðtøkur fyri grunnin, ið vera at góðkenna av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. (§ 4)
Nevndin er hægsti myndugleiki og hevur ábyrgdina av virki grunsins. (§ 4)
Dagliga virksemi grunsins fyrisitur Lønjavningarstova Fiskimanna. (§ 4, stk. 2)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landsstýrið góðkennir viðtøkur. (§ 4)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Roknskapurin fyri grunnin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar í fylgiskjali til landsroknskapin.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Løgtingið kann við lóg broyta virksemi grunninsins, herundir taka grunnin av. Løgtingið ger tá av, hvat skal henda við ogninum hjá grunninum. (§ 7, stk. 2)

**Ognarviðurskifti**
Forskotgrunnur Fiskiflotans er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans. Um grunnurin verður avtikin, ger løgtingið av, hvat skal handa við ognum grunsins. (§ 7, stk. 2)

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg

**Tilknýti til landsroknskapin**
Grunnurin verður tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin. Grunnurin hevur ikki fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs. at grunnurin eigur at verða tikin við í játtanarroknskapin, og ikki bert sum eitt fylgiskjal til landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.
Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Grunnurin skal grannskoðast av løggildum grannskoðara. (§ 5)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 12

## Búagrunnurin

**Navn**
Færøernes erhvervsfond (Búagrunnur Føroya) (§ 1)

**Endamál**
"Fondens opgave er at tjene til støtte for færøsk erhverv, fortrinsvis fiskerierhvervet." (§ 3)

**Stovnan**
Búagrunnurin er stovnaður við játtan í donsku eykafíggjarlógini fyri fíggjarárið 1950/51.
Stovnsfæ grunnsins kom úr danska ríkiskassanum. (§ 2)
Grunnurin er ein danskur landsgrunnur.

**Lóggáva**
Ongin.
Viðtøkur eru gjørdar fyri grunnin og góðkendar av forsætismálaráðnum 11. juli 1952.

**Leiðsla**
Fyri grunnin situr ein nevnd við 5 limum, sum landsstýrið velur. Nevndin er samansett soleiðis:

1. Landsstyrets kontorchef, der er formand
2. Direktøren for Tryggingarsambandið Føroyar, der er bestyrelsens næstformand
3. Et af Færøernes Rederiforening og Felag Føroyska Trolaraeigara i forening udpeget medlem
4. Et af Føroya Fiskimannafelag og Suðuroya Fiskimannafelag i forening udpeget medlem
5. Et af Føroya Skipara og Navigatørfelag, Føroya Maskinistfelag og Føroya Motorpassarafelag i forening udpeget medlem

De under 3, 4, 5 nævnte medlemmer vælges for 2 år ad gangen. Skulle der inden for de udpegede organer være uenighed eller på anden måde være tvivl om udpegningen, afgør landsstyret, hvem der skal indtræde som medlem. (§ 5)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Fonden er underlagt Færøernes hjemmestyre. (Innleiðing til viðtøkur)
Landsstyret beskikker bestyrelsen. (§ 5)
Landsstyret er berettiget til at tillade begrænset anvendelse af grundkapitalen på nærmere angivne vilkår. (§ 2, stk. 3)

Bestyrelsen er berettiget under landsstyrets overtilsyn at skønne over, hvorledes fondens indtægter bedst kan anvendes til det angivne formål. (§ 4, stk. 2)

Årlige indtægter, der ikke måtte være brugt i løbet af regnskabsåret, kan med landsstyrets billigelse henstå til anvendelse i forbindelse med næste års indtægt. (§ 4, stk. 3)

Skulle der inden for de udpegede organer være uenighed eller på anden måde være tvivl om udpegningen af bestyrelsen, afgør landsstyret, hvem der skal indtræde som medlem. (§ 5, stk. 2)

Fondens regnskaber revideres af lagtingets revisorer og forelægges sammen med årsberetningen landsstyret til decision. (§ 7, stk. 5)

Landsstyret kan foretage ændringer i vedtægterne med statsministeriets godkendelse. (§ 9)

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur onga ávirkan á grunnin.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Roknskapurin verður ikki lagdur fyri løgtingið.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Talan er um grunn, sum er stovnaður av donsku stjórnini. Broytingar í viðtøkum kunnu gerast av landsstýrinum, men hetta krevur góðkenning frá forsætismálaráðnum. (§ 9)
Landsstýrið kann taka grunnin av, men bert eftir góðkenning frá forsætismálaráðnum. (§ 9)

**Ognarviðurskifti**
Stovnsfæið kom úr danska ríkiskassanum. Grunnurin hevur tí tættast tilknýti til danska ríkiskassan.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Talan er ikki um ogn hjá landskassanum, og tískil skal grunnurin ikki við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**
Roknskapurin hjá grunninum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Talan er ikki um ogn hjá landskassanum, og tískil skal grunnurin ikki við í landsroknskapin.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Fondens regnskaber revideres af lagtingets revisorer og forelægges sammen med årsberetning landsstyret til decision. (§ 7, stk. 5).

Når landsstyrets decision foreligger, sendes af landsstyret en afskrift af regnskab og beretning til statsministeriet. (§ 8)

---

## Fylgiskjal 13

## Kommunali láns- og veðhaldsgrunnurin

**Navn**
Kommunali láns- og veðhaldsgrunnurin.

**Endamál**
Kommunali láns- og veðhaldsgrunnurin veitir felagskommunala trygd fyri lánum hjá kommunum. (§ 1, í løgtingslóg nr. 36 frá 20. mars 2000 um kommunalan láns- og veðhaldsgrunn v.m.)

**Stovnan**
Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 189 frá 8. desember 1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. Fæ grunsins kom frá inngjøldum frá kommununum. (§ 9 í løgtingslóg nr. 189 frá 8. desember 1993)
Landskassin hevur inngoldið 25 mio. kr. í grunnin í 1999. Talan er um eina útreiðslu, sum skal verða við til at sanera tær kommunur, ið eru ringast fyri. Hetta er bókað sum ein útreiðsla í landsroknskapinum.
Grunnurin er ein kommunalur grunnur.

**Lóggáva**
Løgtingslóg nr. 189 frá 8. desember 1993 um tær kommunalu fíggjarætlanarnar, ásetan av kommunuskattaprocentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m.

Løgtinglóg nr. 36 frá 20. mars 2000 um kommunalan láns- og veðhaldsgrunn v.m.

Kunngerð nr. 153 frá 10. november 1995 um felagskommunala ábyrgd, veðhaldsgrunn og felgaskommunala borgan, sum broytt við kunngerð nr. 119 frá 19. juni 1997.

**Leiðsla**
Stýrið fyri grunnin hevur 3 limir og 3 tiltakslimir, sum allir verða valdir av landsstýrinum. Allir limir og tiltakslimir í stýrinum skulu vera bý- ella bygdaráðslimir. (§ 4, í kunngerð 153 frá 10. november 1995)

Tórshavnar kommuna setir ein lim og ein tiltakslim í stýrið, sum skal verða býráðsformaður ávíkavist býráðsnæstformaður. (§ 4, stk. 2, í kunngerð 153 frá 10. november 1995)

Føroya Kommunufelag setir ein lim og ein tiltakslim í stýrið, sum skulu verða frá kommunum, sum ikki hava lán úr grunninum. (§ 4, stk. 3, í kunngerð 153 frá 10. november 1995)

Kommunur, sum hava lán úr grunninum, seta ein lim og ein tiltakslim í stýrið. (§ 4, stk. 4, í kunngerð 153 frá 10. november 1995)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**
Landdstýrið tilnevnir stýrið, men limirnir verða valdir av kommununum. (§ 4 í kunngerð 153/1995). Landsstýrið hevur sostatt lítla ávirkan á samansetingina av stýrinum.

Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um fyrisiting av grunninum, virki grunsins, heruppií treytir fyri veitan av trygd og um avtøku av grunninum. (§ 10 í kunngerð 153/1995).
Grunnurin er undir eftirliti av landsstýrinum. (§ 16, í kunngerð 153/1995).

**Ávirkan hjá løgtinginum**
Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**
Løgtingið fær ikki roknskapin fyri grunnin fyrilagdan.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**
Eftir 1. desember 2000 kann landsstýrismaðurin taka grunnin av, um hann metir, at grundarlag ikki er fyri felags fígging av kommunuskuld. (§ 10, stk. 2, í Ll. 36/2000)
Verður grunnurin avtikin, fáa kommunurnar útgoldið fæið í grunninum. (§ 10, stk. 3, í Ll. 36/2000)
Landsstýrið skal geva loyvi til at avtaka grunnin. (§ 17, í kunngerð 153/1995).

**Ognarviðurskifti**

goldið hava inn í grunnin, hava ognarrættin til fæið. Við avtøku fellur fæið aftur til kommunurnar eftir einum føstum lutfalli. (§ 8, í Ll. 36/2000).

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**
Grunnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Talan er ikki um ein landsgrunn, og tískil skal hann ikki við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

**Tilknýti til landsroknskap**
Grunnurin verður ikki tikin við í landsroknskap. Talan er um ein kommunalan grunn, og tískil skal hann ikki við í landsroknskapin.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapir fyri grunnin verða grannskoðaðir av roknskapardeild landskassans. (§ 15, í kunngerð 153/1995).

---

## Fylgiskjal 14

## Happadráttargrunnurin

### Navn

Happadráttargrunnurin.

### Endamál

Happadráttargrunnurin hevur til endamáls at býta út teir 2/3 av avlopinum frá føroyska happadráttinum, sum eftir § 1, litra f í happadráttarlógini verða lagdir í grunnin. (§ 1 í kunngerð 91/1987)

### Stovnan

Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 21 frá 14. mars 1986. Eftir hesa broyting í Ll. 49/1950 verða 2/3 av yvirskotinum av happadráttinum sett í grunn, ætlaður brekaðum. (§ 1, litra f í Ll. 49/1950)

Happadráttargrunnurin er ein landsgrunnur.

### Lóggáva

Løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 29. desember 1998.

Kunngerð nr. 91 frá 21. oktober 1987 um reglugerð fyri happadráttargrunnin, sum broytt við kunngerð nr. 100 frá 30. oktober 1989.

### Leiðsla

Ovasta leiðsla grunsins er eitt trímannastýri, sum landsstýrið tilnevnir. Tveir av stýrislimunum

verða tilnevndir eftir tilmæli frá Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum. Landsstýrið tilnevnir ein av limunum at vera formaður í stýrinum. (§ 2)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið fyriskrivar reglur fyri happadráttaskipanina og almennu umsjónini við tí. (§ 2 í Ll. 49/1950)

Landsstýrið tilnevnir stýrislimirnar. (§ 2 í Kunngerð 91/1987)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin fyri grunnin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar í fylgiskjali til landsroknskapin.

Talan er um vanligan landsgrunn, ið ikki hevur fingið delegerað fíggjarheimild. Roknskapurin eigur tí at verða tikin við í játtanarroknskapin, eins og aðrir landsgrunnar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**

Grunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Hóast inngjaldið frá landskassanum er við á løgtingsfíggjarlóg, so er útgjald og virksemið annars ikki tikið við á fíggjarlóg.

Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið hjá grunninum at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

### Tilknýti til landsroknskapin

Grunnurin verður tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin. Grunnurin hevur ikki fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs. at grunnurin eigur at verða tikin við í játtanarroknskapin og ikki bert sum eitt fylgiskjal til landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

### Grannskoðanarviðurskifti

Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara, sum stýrið tilnevnir. (§ 5, stk. 2 í kunngerð 91/1987)

Talan er um ein landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 15

## Orðabókagrunnurin

### Navn

Orðabókagrunnurin. (§ 1)

### Endamál

Endamál grunsins er at gjalda heilt ella lutvíst arbeiðstilfar, amboð og tímalønir, ið standast av føroyskum orðabókaarbeiði.

### Stovnan

Føroya Fróðskaparfelag.

Stovnsskipanin (fundatsurin) varð kunngjørd við kunngerð nr. 54 frá 30. juni 1964 av fundatsi um orðabókagrunn.

Inn í grunnin gongur avlopspeningur av søluni av føroysk-donsku orðabókini eftir Chr. Matras, avlopspeningur av øllum orðabókum, sum Málstovnur Føroya Fróðskaparfelags gevur út, og av orðabókum, sum fingið hava studning, ið er treytaður av, at avlopspeningurin frá søluni heilt ella lutvíst skal fara í henda grunn. (§ 3)

Orðabókagrunnurin er ein sjálvsognarstovnur.

**Lóggáva**

Ongin.

Kunngerð nr. 54 frá 30 juni 1964 av fundatsi um orðabókagrunn.

**Leiðsla**

Grunnurin verður stýrdur av 3 manna nevnd:

1. Tann sitandi landsstýrismaðurin, sum hevur mentamál undir sær
2. Ein limur valdur av Føroya Fróðskaparfelag
3. Vísindaligi fyristøðumaðurin fyri Málstovnin. (§ 6)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrismaðurin í mentamálum er limur í nevndini. (§ 6)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ikki ávirkan á grunnin.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður ikki lagdur fyri løgtingið.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Grunnurin kann broytast eftir reglunum, sum eru galdandi fyri sjálvsognarstovnar.

**Ognarviðurskifti**

Talan er um ein sjálvsognarstovn. Hann eigur tískil seg sjálvan.

### Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við á fíggjarlóg ella játtanarlóg. Talan er um veruligan grunn, og skal hann tí ikki við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

### Tilknýti til landsroknskapin

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í landsroknskap. Talan er um veruligan grunn, og skal hann tí ikki við í landsroknskapin.

### Grannskoðanarviðurskifti

Nevndin skal á hvørjum ári í seinasta lagi 31. mai senda landsstýrinum frágreiðing og roknskap fyri grunnin til grannskoðan. (§ 7)

---

## Fylgiskjal 16

## Mentanargrunnur Landsins

### Navn

Mentanargrunnur Landsins.

### Endamál

Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. (§ 1 í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000)

### Stovnan

Grunnurin varð stovnaður við reglugerð frá 12. september 1947.

Stovnsfæ grunsins varð játtað úr tiltaksgrunni tingsins. (§ 2 í reglugerð frá 12. september 1947)

Mentanargrunnurin er ein landsgrunnur.

### Lóggáva

Løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins.

Kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins.

**Leiðsla**

Grunnurin verður stjórnaður av fimmmannanevnd, sum landsstýrismaðurin í mentamálum setir. (§ 3 í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000)

Landsstýrismaðurin tilnevnir 5 varalimir. Tveir av nevndarlimunum og tveir av varalimunum skulu tilnevnast eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya. (§ 2 í K. nr. 109 frá 21. september 2000)

Landsstýrismaðurin tilnevnir formann og næstformann. (§ 3 í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Grunnurin verður stjórnaður av fimmmannanevnd, sum landsstýrismaðurin í mentamálum setir. (§ 3)

Landsstýrismaðurin tilnevnir formann og næstformann. (§ 3 í løgtinslóg nr. 84 frá 17. mai 2000)

Landsstýrismaðurin skipar fyri fyrisiting grunsins. (§ 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000)

Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri virksemi grunsins. (§ 4)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin fyri grunnin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar í fylgiskjali til landsroknskapin.

Talan er um vanligan landsgrunn, ið ikki hevur fingið delegerað fíggjarheimild. Roknskapurin eigur tí at verða tikin við í játtanarroknskapin, eins og aðrir landsgrunnar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**

Grunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

### Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella játtanarlóg. Hóast inngjaldið frá landskassanum er við á løgtingsfíggjarlóg, so er útgjald og virksemi annars ikki tikið við á fíggjarlóg.

Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

### Tilknýti til landsroknskapin

Grunnurin verður tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin. Grunnurin hevur ikki fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs. at grunnurin eigur at verða tikin við í játtanarroknskapin, og ikki bert sum eitt fylgiskjal til landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

### Grannskoðanarviðurskifti

Talan er um ein landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 17

## Grunnurin Kirkjubømúrurin

### Navn

Grunnurin Kirkjubømúrurin

### Endamál

til varðveitslu av øðrum fornminnum í Kirkjubø. (§ 4)

**Stovnan**

Grunnurin varð stovnaður við kunngerð nr. 52 frá 5. desember 1957: Reglugerð fyri grunnin til varðveitingar av fornminnum í Kirkjubø.

Grunsin grundfæ eru tær ognir, sum "Fonden til bevaring af Kirkebøruinen på Færøerne" eigur, og harafturat 25.000 kr., sum pf. Føroya Banki í Tórshavn gav til nevnda endamál. (§ 1)

Grunnurin er ein sjálvsognarstovnur.

**Lóggáva**

Ongin.

Kunngerð nr. 52 frá 5. desember 1957: Reglugerð fyri grunnin til varðveitingar av fornminnum í Kirkjubø.

**Leiðsla**

Føroya Landsstýri er stýri grunsins. (§ 5)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Føroya Landsstýri er stýri grunsins. (§ 5)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ikki ávirkan á grunnin.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður lagdur fyri løgtingið sum fylgiskjal til landsroknskapin. Grunnurin hevur einki tilknýti til landskassan. Tí eigur roknskapurin ikki at verða lagdur fyri tingið sum "eskternur grunnur", saman við grunnum sum eru vanligir landsgrunnar.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Grunnurin kann broytast eftir reglunum, sum eru galdandi fyri sjálvsognarstovnar.

**Ognarviðurskifti**

Talan er um veruligan grunn. Hann eigur tískil seg sjálvan.

### Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við á fíggjarlóg ella játtanarlóg. Talan er um veruligan grunn, og skal hann tí ikki við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

### Tilknýti til landsroknskapin

Virksemið hjá grunninum verður tikið við sum fylgiskjal til landsroknskapin. Talan er um veruligan grunn, og skal hann tí ikki við sum "eksternur grunnur" í landsroknskapin.

### Grannskoðanarviðurskifti

Føroya gjaldstova heldur roknskapin; hann verður endurskoðaður av grannskoðara løgtingsins og decideraður av landsstýrinum.

---

## Fylgiskjal 18

## Fróðskaparsetur Føroya

### Navn

Fróðskaparsetur Føroya.

### Endamál

Fróðskaparsetur Føroya hevur til endamáls at inna gransking, geva frálæru á hægri stigi og breiða út kunnleika um vísindalig háttaløg og úrslit. (§ 1)

### Stovnan

Stovnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 28 frá 20. mai 1965 um at seta á stovn Fróðskaparsetur Føroya.

Fæ stovnsins kom partvíst frá privatum sum gávur og frá játtan á fíggjarlóg.

Stovnurin er ein landsstovnur.

### Lóggáva

Løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1987 um Fróðskaparsetur Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 84 frá 13. juni 1995.

**Leiðsla**

Fyrisitingarliga stendur fróðskaparsetrið beint undir landsstýrinum. (§ 3)

Leiðsluna av fróðskaparsetrinum hevur rektarin saman við setursráð og megindeildarráðnum. (§ 5)

Rektarin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni og stendur beinleiðis fyri teimum málum, sum ikki sambært lóg ella reglugerð liggja undir ráðunum. (§ 6)

Fróðskaparsetrið verður stýrt av setursráðnum. (§ 11)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Samstarvsnevndin skal vera liður millum landsstýrið og fróðskaparsetrið. (§ 15)

Landsstýrið tilnevnir ein lim at umboða landsfyrisitingina. (§ 15, stk. 4)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin fyri stovnin Fróðskaparsetur Føroya verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar sum partur av játtanarroknskapinum. Ein partur av fróðskaparsetrinum liggur tó uttan fyri eftirlit løgtingsins. Roknskapurin hjá "Fróðskaparsetur Føroya – Sjálveigandi stovnur" verður ikki lagdur fyri tingið.

Tá talan er um landsstovn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann broyta virksemi stovnsins, herundir taka stovnin av. Løgtingið ger tá av, hvat skal henda við ognunum hjá stovninum. Tann partur av ognum stovnsins sum eru gávur frá privatum kann tó bert fara til endamálið hjá stovninum.

**Ognarviðurskifti**

Stovnurin er landsstovnur og er sostatt ogn landskassans.

### Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Virksemið hjá fróðskaparsetrinum verður tikið við í fíggjarlóg. Virksemið hjá "Fróðskaparsetur Føroya - sjálveigandi stovnur" verður tó ikki tikið við í fíggjarlóg. Talan er ikki um ein sjálveigandi stovn, men um ein landsstovn. Virksemið hjá "Fróðskaparsetur Føroya - Sjálveigandi stovnur" skal tí við í fíggjarlóg, eins og virksemið hjá restini av fróðskaparsetrinum.

### Tilknýti til landsroknskapin

Fróðskaparsetrið verður tikið við í landsroknskapin. "Fróðskaparsetur Føroya - Sjálveigandi stovnur" verður ikki tikið við í landsroknskapin. Talan er ikki um ein sjálveigandi stovn, og ikki um ein landsstovn, ið hevur fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs. at stovnurin eigur at verða tikin við í landsroknskapin á sama hátt sum restin av fróðskaparsetrinum.

Stovnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Stovnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Stovnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

### Grannskoðanarviðurskifti

Fróðskaparsetrið verður grannskoðað eftir reglum um grannskoðan av landsroknskapinum.

"Fróðskaparsetur Føroya - sjálveigandi stovnur" er ein landsstovnur, við sjálvstøðugum roknskapi. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 19

## Granskingargrunnurin

### Navn

Granskingargrunnurin.

### Endamál

Granskingargrunnurin hevur til endamáls at stuðla gransking. (§ 1)

**Stovnan**

Grunnurin varð stovnaður við Ll. 85/2001.

Fæ grunsins kom úr landskassanum. (§ 19, stk. 2)

Granskingargrunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Løgtingslóg nr. 85 frá 15. mai 2001 um gransking.

**Leiðsla**

Grunnurin verður stjórnaður av einum granskingarráði við 7 limum, sum verða tilnevndir fyri 3 ár í senn og kunnu ikki sita í ráðnum longur enn 2 skeið í senn. Landsstýrismaðurin í ávíkavist heilsumálum, vinnumálum, fiskimálum og granskingarmálum tilnevna hvør sín lim, meðan Føroya Arbeiðsgevarafelag tilnevnir 2 limir. Herumframt tilnevnir landsstýrismaðurin í granskingarmálum ein lim, sum eisini er formaður ráðsins. (§ 3)

Granskingarráðið hevur ovastu leiðsluna yvir grunninum og yvirskipaðu ábyrgdina av, at ásetingarnar í lógini um virksemi grunsins verða fylgdar, og at grunnurin virkar samsvarandi endamálinum. (§ 5)

Granskingarráðið umsitir granskingargrunnin og tekur endaliga støðu til, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar. (§5, stk. 4)

Granskingarráðið setir og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis Granskingarráðnum fyri, at virksemi grunsins verður rikið sambært galdandi reglum. (§ 8)

Stjórin skal í samstarvi við Granskingarráðið umsita grunnin innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál grunsins. (§ 9)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið velir 5 av 7 limum í granskingarráðið, sum hevur ovastu leiðsluna yvir granskingargrunninum.. (§ 3)

Landsstýrismaðurin í granskingarmálum skal góðkenna starvsskipan. (§ 4)

**Ávirkan hjá løgtinginm**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

Løgtingið játtar stuðul og umsitingarútreislur hjá grunninum.

## Eftirlit hjá løgtinginum

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

## Broyting av virksemi/avtøka av grunni

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av.

## Ognarviðurskifti

Grunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

## Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Raksturin hjá grunninum verður tikin við á fíggjarlóg undir § 7.23.6.20. Harumframt verður stuðulin til grunnin tikin við á fíggjarlóg undir § 7.23.6.21. Stuðul úr grunninum verður tó ikki tikin við á fíggjarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur alt virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

§ 17, stk. 3 í Ll. 85/2001 um granskingargrunn ásetir, at ársúrslitið verður flutt til næsta roknskaparár. Henda áseting er í stríð við § 43, stk. 2 í stýrisskipanarlógini.

## Tilknýti til landsroknskapin

Grunnurin hevur ikki fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs. at grunnurin eigur at verða tikin við í játtanarroknskapin á sama hátt sum aðrir landsgrunnar.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

## Grannskoðanarviðurskifti

Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara, sum Granskingarráðið velur fyri 1 á í senn. (§ 17, stk. 4)

Grannskoðaður roknskapur og grannskoðanarfrágreiðingin fyri grunnin skulu fyri 1. juni á hvørjum ári sendast landsstýrismanninum í granskingarmálum til góðkenningar. (§ 18)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 20

## Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar

### Navn

Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar.

## Endamál

Grunnurin kann veita endurgjald fyri tiltøk, framd smbr. § 7 í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum við seinni broytingum. Tá landsdjóralæknin gevur boð um, at fiskur verður avlívaður, kann endurgjald verða veitt úr grunninum, tó bert har trygging ikki tekur við. (§§ 1-2)

§ 7 í omanfyri nevndu lóg ásetir, at landsdjóralæknin kann krevja, at tiltøk verða sett í verk, eisini at fiskur, skeljadýr ella krabbadýr verða avlívað, um tað verður hildið neyðugt fyri at fyribyrgja, avmarka ella beina fyri teimum sjúkum, sum lógin fevnir um.

### Stovnan

Grunnurin varð stovnaður við lóg nr. 87 frá 28 mai 1996 um endurgjaldsgrunn til alivinnuna.

Grunnurin er ein landsgrunnur.

### Lóggáva

Løgtingslóg nr. 87 frá 28. mai 1996 um endurgjaldsgrunn til alivinnuna.

Kunngerð nr. 155 frá 12. desember 1997 um reglur fyri endurgjaldsgrunn til alivinnuna.

### Leiðsla

Grunnurin hevur eina nevnd við 3 limum. Tveir limir verða tilnevndir av landsstýrinum og ein av

Havbúnaðarfelagnum. Fiskivinnuumsitingin tekur sær av dagliga rakstrinum av grunninum. (§ 3)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið velur meirilutan í nevndini. (§ 3, stk. 2)

Landsstýrið ásetir nærri reglur um virki grunsins. (§ 7)

Landsstýrið kann eftir tilmæli frá nevndini taka grunnin av. (§ 8) Landsstýrið ger í hesum føri av, hvussu verða skal við ognum grunsins. (§ 8, stk. 2). Landsstýrið kann tó ikki taka slíka avgerð, uttan fyrst at spyrja løgtingið eftir, sí stýrisskipanarlógin § 43, stk. 2.

Nevndin ger starvsskipan, ið skal góðkennast av landsstýrinum. (§1, stk. 4, í kunngerð 155/1997)

Fiskivinnuumsitingin tekur sær av dagliga rakstrinum av grunninum. (§ 3)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin fyri grunnin verður lagdur fyri løgtingið til samtyktar í fylgiskjali til landsroknskapin.

Talan er um vanligan landsgrunn, ið ikki hevur fingið delegerað fíggjarheimild. Roknskapurin eigur tí at verða tikin við í játtanarroknskapin, eins og aðrir landsgrunnar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av.

Sambært lógini tekur landsstýrið støðu til, hvussu skal verða við ognunum, um grunnurin verður tikin av. (§ 8, stk. 2). Landsstýrið kann tó ikki taka slíka avgerð, uttan fyrst at spyrja løgtingið eftir, sí stýrisskipanarlógin § 43, stk. 2.

**Ognarviðurskifti**

Hóast alarar og landskassin í felag gjalda inn í grunnin, er talan um ein landsgrunn. Grunnurin er sostatt ogn landskassans

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Hóast inngjaldið frá landskassanum er við á løgtingsfíggjarlóg, so er útgjaldið og virksemið annars ikki tikið við á fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. (§ 6) Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**

Grunnurin verður tikin við sum fylgiskjal til landsroknskapin. Grunnurin hevur ikki fingið delegerað fíggjarheimild. Tvs. at grunnurin eigur at verða tikin við í játtanarroknskapin og ikki bert sum eitt fylgiskjal til landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglurgerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**

Grannskoðanardeild Landskassans hevur grannskoðanina um hendi. (§ 8, stk. 2, í kunngerð nr. 155 frá 12. desember 1997)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í játtanarroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 21

## Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

### Navn

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin (AMG).

### Endamál

Endmálið er at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn. (§ 1)

**Stovnan**

Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 71 frá 9. juni 1988 um samhaldsfastan arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum fekk gildi frá 1. januar 1990.

Grunnurin varð stovnaður av nýggjum við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 14 frá 16. februar 2001.

Fæ grunsins verður fingið til vega við, at allir persónar árliga rinda grunninum ein part av inntøkuni, og allir arbeiðsgevarar árliga rinda ein part av útgoldnum A-inntøkum. (§ 2)

Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 14. frá 16. februar 2001.

Kunngerð nr. 112 frá 20. desember 1991 um gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Kunngerð nr. 34 frá 16.apríl 1997 um røkt av fæi arbeiðsmarknaðareftirlønargrunsins.

**Leiðsla**

At sita fyri eftirlønargrunninum velur landsstýrið stýrið við 4 limum soleiðis:

- Ein umboðandi arbeiðsgevarar
- Ein umboðandi løntakarar
- Ein umboðandi Tryggingarsamband Føroyar
- Stjóran í Landsbanka Føroya. (§ 6)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið setir stýrið fyri grunnin. (§ 6)

Landsstýrið góðkennir stavsskipan fyri grunnin. (§ 6, stk. 3)

Landsstýrið viðger kærur um útgjald úr grunninum. (§ 10 A)

Toll- og Skattstova Føroya hevur um hendur inngjaldingar í grunnin. (§ 8)

Toll- og Skattstova Føroya hevur um hendur útgjaldingar úr grunninum (§ 8, stk. 2 og avtalu frá 7.11.1997)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin fyri grunnin verður ikki lagdur fyri løgtingið.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann við lóg broyta virksemið hjá grunninum. Løgtingið kann eisini taka grunnin av. Løgtingið ger tá av, hvat skal henda við ogninum hjá grunninum.

Lógin um AMG gevur øllum pensjónistum ein rætt til eitt ávíst útgjald úr grunninum. Tað eru allir arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar, ið hava goldið inn í grunnin. Talan er tó ikki um ein ognarrætt hjá pensjónistum, men um ein við lóg ásettan rætt til eitt ávíst útgjald. Henda rætt hevur hvør persónur, ið hevur fastan bústað í Føroyum, er skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum og hevur fylt 67 ár. (§ 3) Hesin rættur kann ikki arvast ella verða fyri rættarsókn og fellur burtur, um pensjónisturin flytur av landinum ella doyr. (§§ 3, 3, 2. stk., 2. pkt. og 10).

Útgaldið verður ásett av stýrinum fyri grunnin. (§ 5)

Um grunnurin verður avtikin, og løgtingið ger av, at fæið skal nýtast til annað endamál enn útgjald til pensjónistar, er ikki talan um ognartøku, ið viðførur endurgjaldsskyldu sambært grundlógarinnar § 73. Spurningurin verður viðgjørdur av Alf Ross: Dansk Statsforfatningsret II, 2. udgave, 1966, s. 629-638 og 644-649.

**Ognarviðurskifti**

Hóast lógin ásetir, at fæið skal nýtast til eitt ávíst endamál, hevur løgtingið heimild at broyta hetta endamál. Grunnurin er ein landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Inngjald til grunnin er ein skattur. (Allýsing av nær talan er um skat finnst m.a. í Skatteretten 1, 3.útgáva, Jens Olav Engholm Jacobsen o.o., s. 26-28 og Lærebog om indkomstskat, 8. útgáva, Linda Hulgaard o.o., s. 1-3 og Dansk Statsforfatningsret II, 3. udgave, Alf Ross ved Ole Espersen, 1983, s. 838-841.)

Grunnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

Sambært § 41, stk. 1 í stýrisskipanarlógini kann eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Sambært § 41, stk. 3 í stýrisskipanarlógini er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í § 41, stk. 1, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi. Sostatt skulu øll inngjøld til grunnin ásetast við lóg og takast við í fíggjarlóg.

Inngjaldið til grunnin kann ikki haldast uttan fyri fíggjarlóg, av tí at talan er um skatt.

Útgjald úr einum landsgrunni er ein útreiðsla hjá landinum. Útreiðslur til umsiting av einum landsgrunni eru útreiðslur hjá landinum. Hóast løgtingslóg nr. 39/1991 § 9 ásetir, at grunnurin rindar fyri umsiting av inngjøldum og útgjøldum úr grunninum, er talan um útreiðslu hjá landinum, sum eftir stýrisskipanarlógini skal játtast á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Eingin lógarheimild er at halda útreiðslur hjá AMG uttan fyri fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at útreiðslur hjá grunninum skulu haldast uttan fyri fíggjarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**

Grunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**

Stýrið velur grannskoðara. (§ 15, í Starvsskipan fyri stýrið)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 22

## Frítíðargrunnurin

**Navn**

Frítíðargrunnurin.

**Endamál**

Endamálið er fíggja tiltøk, ið útvega løntakarum frítíðarmøguleikar. (§ 21, stk. 2 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn).

**Stovnan**

Frítíðargrunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 23. mai 1997.

Fæ grunsins fæst til vega frá rentuinntøkum og peningi, ið ikki er tikin út í frítíðarárinum, sum frítíðin skuldi verið tikin í. (§ 18 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986).

Harafturat hoyrir til fæ grunsins tann upphædd, sum 1. apríl 1986 sambært landskassans roknskapi stóð í grunninum. (§ 2, stk. 2 í kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988) Henda upphædd er tó aldrin flutt grunninum.

Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 23. mai 1997.

Kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988 um virki og fyrisiting av frítíðargrunninum.

**Leiðsla**

At sita fyri frítíðargrunninum verður nevnd vald, sum hevur 5 limir. (§ 3 í kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988)

Landsstýrið velur formannin.

Landsstýrið velur 3 limir eftir uppskoti frá løntakarfeløgunum.

Landsstýrið velur 1 lim eftir uppskoti frá arbeiðsgevarafeløgunum.

Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri virki grunsins og fyrisiting av grunninum. (§ 21, stk. 4 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Frítíðargrunnurin er grunnur undir landsstýrinum. (§ 21 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986)

Landsstýrið velur alla nevndina fyri grunnin. (§ 3)

Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri virki grunsins og fyrisiting av grunninum. (§ 21, stk. 4 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan á grunnin gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður ikki lagdur fyri løgtingið.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av. Um grunnurin verður tikin av, tekur løgtingið støðu til, hvat skal henda við ognini hjá grunninum.

**Ognarviðurskifti**

Grunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Grunnurin verður ikki tikin við á fíggjarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin fyri grunnin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

Útreiðslur til umsiting av einum landsgrunni eru útreiðslur hjá landinum. Hóast § 3, stk. 4 í kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988 heimilar grunninum at fíggja raksturin av fæi grunsins, er talan um almenna útreiðslu, sum eftir stýrisskipanarlógini § 43, stk. 2, skal játtast á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**

Roknskapurin hjá Frítíðargrunninum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**

Nevndin velur ein løggildugan grannskoðara til at grannskoða roknskapirnar, sum verða sendir landsstýrinum á hvørjum ári innan 1. juni. (§ 4, stk. 3 í kunngerð 101/1988)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 23

## Arbeiðsloysistryggingin

**Navn**

Arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. (ALS)

**Endamál**

Arbeiðsloysisskipanin hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. (§ 1)

**Stovnan**

Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað við løgtingslóg nr. 17 frá 19. mars 1992 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Stovnsfæið kom úr landskassanum. (§ 6)

Løgtingið hevur síðani stovnanina skipað fyri fígging av skipanini, partvíst við at flyta pening úr øðrum almennum grunnum sum lán og beinleiðis stuðul, og partvíst við at áleggja øllum skattgjaldarum at gjalda til skipanina.

Stovnurin er ein landsstovnur.

**Lóggáva**

Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 9. februar 2001.

Kunngerðir gjørdar við heimild í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997.

**Leiðsla**

At sita fyri og hava ábyrgdina av arbeiðsloysisskipanini verður stýri valt. Stýrið setir stjóra at hava dagligu leiðsluna um hendur.

Stýrið hevur 7 limir, sum verða valdir av landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum.

3 limir umboða løntakarafeløgini og verða valdir eftir uppskoti frá løntakarafeløgunum, 1 umboðandi løntakarafeløgini hjá tímaløntum, 1 umboðandi feløgini hjá fiski- og útróðrarmonnum og 1 limur umboðandi lønir hjá starvsfólkum.

2 limir skulu umboða privatu arbeiðsgevararnar og verða valdir eftir uppskoti frá arbeiðsgevarafeløgunum.

1 limur skal umboða hitt almenna sum arbeiðsgevara.

7. limurin er formaður. (§ 4)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið velur stýrið. (§ 4)

Landsstýrið velur kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini. (§ 26, 3. stk.)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður ikki lagdur fyri løgtingið.

Tá talan er um landsstovn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av stovni/grunni**

Løgtingið kann við lóg broyta virksemi stovninsins, herundir taka stovnin av. Løgtingið ger tá av, hvat skal henda við ognunum.

Lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing gevur arbeiðsleysum ein rætt til eitt ávíst útgjald. Tað eru allir arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar, ið hava goldið inn í skipanina, umframt landskassin. Talan er tó ikki um ein ognarrætt hjá arbeiðsleysum, men um ein við lóg ásettan rætt til eitt ávíst útgjald. Henda rætt hevur hvør persónur, ið er arbeiðsleysur, er tøkur á arbeiðsmarknaðinum, er millum 16 og 67 ár, hevur bústað í Føroyum og er arbeiðsførur. (§ 14) Útgjaldið verður ásett í kapittul 15 í lógini.

Um stovnurin verður avtikin, og løgtingið ger av, at fæið skal nýtast til annað endamál enn útgjald til arbeiðsleys, er ikki talan um ognartøku, ið viðførur endurgjaldsskyldu sambært grundlógarinnar § 73. Spurningurin verður viðgjørdur av Alf Ross: Dansk Statsforfatningsret II, 2. udgave, 1966, s. 629-638 og 644-649.

**Ognarviðurskifti**

Arbeiðsloysisskipanin er landsstovnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Inngjaldið til stovnin er ein skattur. (Allýsing av nær talan er um skat finnst m.a. í Skatteretten 1, 3.útgáva, Jens Olav Engholm Jacobsen o.o., s. 26-28 og Lærebog om indkomstskat, 8. útgáva, Linda Hulgaard o.o., s. 1-3 og Dansk Statsforfatningsret II, 3. udgave, Alf Ross ved Ole Espersen, 1983, s. 838-841.)

Stovnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Sambært § 41, stk. 1 í stýrisskipanarlógini kann eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg.

Tá stýrið sambært § 9, stk. 3, fær heimild at broyta ALS-gjaldið, er talan om brot á stýrisskipanarlógina § 41, 1. stk. Undantøk frá ásetingini § 41, stk. 1 í stýrisskipanarlógini kunnu ikki gerast. (Spurningurin verður nærri viðgjørdur í Dansk Statsforfatningsret II, 3. udgave, Alf Ross ved Ole Espersen, 1983, s. 842-844 og Dansk Forfatningsret 4, Henrik Zahle, 1989, s. 221-222)

Sambært § 41, stk. 3 í stýrisskipanarlógini er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í § 41, stk. 1, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi. Sostatt skullu øll inngjøld til stovnin ásetast við lóg og takast við í fíggjarlóg.

Uttan heimild í fíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg kann innkrevingin ikki gerast uttan at bróta ásetingina í § 41, 3. stk. Undantøk frá hesi meginreglu kunnu ikki gerast. (Spurningurin verður nærri viðgjørdur í Dansk Statsforfatningsret II, 3. udgave, Alf Ross ved Ole Espersen, 1983, s. 842-844 og Dansk Forfatningsret 4, Henrik Zahle, 1989, s. 221-222)

Útgjaldið úr einum landsstovni ella -grunni er ein útreiðsla hjá landinum. Útreiðslur til umsiting av einum landsstovni ella -grunni eru útreiðslur hjá landinum. Eingin heimild er at halda útreiðslur hjá ALS uttan fyri fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Antin eigur lógin fyri ALS at verða broytt soleiðis, at hon ásetir, at útreiðslur hjá stovninum skulu haldast uttan fyri fíggjarlóg, ella eigur virksemið at verða játtað í fíggjarlóg.

### Tilknýti til landsroknskapin

Stovnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin. Inntøkur stovnsins kunnu tó ikki haldast uttan fyri játtanarroknskapin.

Stovnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Stovnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Stovnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

### Grannskoðanarviðurskifti

Roknskapurin verður grannskoðaður av lóggildum grannskoðara. (§ 5, stk. 2)

Talan er um ein landsstovn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 24

## Framtaksgrunnurin

### Navn

Færøernes Erhvervsudviklingsfond. (Framtaksgrunnur Føroya)

### Endamál

Endamál grunsins er at gera íløgur í nýggjar verkætlanir ella í víðkað vinnuvirksemi í fyritøkum, herundir fyritøkum, sum hava verið fyri týðandi umskipan ella skuldarumlegging. (§ 2 í viðtøkunum)

### Stovnan

Danska stjórnin og landsstýrið hava stovnað grunnin. Sí hervið "Fælleserklæring frá møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre".

Fæ grunsins kom frá donsku stjórnini og føroyska landsstýrinum

Framtaksgrunnurin er ein sjálvsognarstovnur.

**Lóggáva**

Grunnurin er vinnurekandi grunnur og umfataður av reglunum fyri vinnurekandi grunnar í Anordning nr. 247 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde.

Viðtøkur er gjørdar.

Løgtingslóg nr. 84 frá 31. mai 1994 um partapening í framtaksfelag.

Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1995 um lántøku til landskassan.

**Leiðsla**

Grunnurin verður stýrdur av eini nevnd, sum telur 5 limir. Landsstýrið (landsstýrismaðurin í vinnumálum) velur 4 limir. Hesir 4 velja so fimta nevndarlimin. Nevndin verður vald fyri 1 ár í senn. (§ 4 í viðtøkunum).

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið velur 4 nevndarlimir. Annars hevur landsstýrið onga ávirkan á grunnin.

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur onga ávirkan á grunnin.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður ikki lagdur fyri løgtingið.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Broyting av viðtøkum fyri grunnin kunnu bert gerast sambært „anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde" nr. 247 frá 2. mai 1993. Lógin ásetir soleiðis:

- "Efter indstilling fra bestyrelsen og med justitsministerens samtykke kan fondsmyndigheden tillade, at en bestemmelse i en vedtægt ændres. Det kan herunder tillades, at fonden sammenlægges med andre erhvervsdrivende fonde eller opløses." (§ 48)

Broytingar í viðtøkum kunnu sostatt bert gerast av nevndini sambært samtykt frá danska løgmálaráðharranum, um so er at "fondsmyndigheden" loyvir tí. "Fondsmyndigheden" er í hesum føri danska ídnaðarmálaráðið ella løgmálaráðið, sí § 57. Hetta er eisini galdandi fyri avtøku av grunninum.

Viðtøkurnar kunnu bert broytast, um nevndin er samd. (§ 9 í viðtøkunum)

"Efter dækning af samtlige kreditorer, herunder det i § 3 nævnte lån, uddeles fondens nettoformue til fremme af fondens formål og/eller til almennyttige formål. Uddelingen skal godkendes af fondsmyndigheden". (§ 10, 2. stk., í viðtøkunum)

**Ognarviðurskifti**

Talan er um vinnurekandi grunn, t.e. at grunnurin eigur seg sjálvan.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Framtaksgrunnurin hevur einki tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg.

**Tilknýti til landsroknskapin**

Framtaksgrunnurin verður ikki tikin við í landsroknskapin.

**Grannskoðanarviðurskifti**

Fondens årsregnskab skal revideres af en af bestyrelsen valgt registreret eller statsautoriseret revisor. (§ 8 í viðtøkunum)

---

**Fylgiskjal 25**

**Vinnuframagrunnurin**

**Navn**

Vinnuframagrunnurin.

**Endamál**

Endamálið er at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Grunnurin skal virka samsvarandi vinnupolitikki landsins og annars innan tær avmarkingar, ið settar eru í lógini fyri grunnin, og tær avmarkingar, ið altjóða samvinnulag til eina og hvørja tíð natúrliga setir. (§ 1)

**Stovnan**

Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn.

Stovnsfæ grunsins verður útvegað við avtøku av:

1. Grunninum til ídnaðarfremjandi endamál

2. Gistingarhúsgrunninum (Grunnur Ferðavinnunar)
3. Føroya Ídnaðargrunni
4. Menningargrunninum
5. Ábyrgdargrunninum (§ 2, sí § 7)

Vinnuframagrunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn.

**Leiðsla**

Grunnurin verður fyrisitin av einum av landsstýrismanninum í vinnumálum tilnevndum stýri við 5 limum. Landsstýrismaðurin velur formannin. (§ 3)

Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur í kunngerð um umsiting og virksemi grunsins. (§ 3, stk. 2)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrismaðurin velur stýrið og formannin fyri stýrið. (§ 3).

Landsstýrismaðurin ásetir reglur um umsiting og virksemi grunsins. (§ 3, stk. 2)

Landsstýrismaðurin staðfestir í stuðulsskipanum hvørji endamál, ið Vinnuframagrunnurin kann stuðla og undir hvørjum treytum, herímillum hvørji vinnugreinaøki kunnu verða stuðlað. (§ 4)

Grunnurin skal virka samsvarandi vinnupolitikki landsins. (§ 1)

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

Løgtingið hevur harumframt ávirkan á virksemið gjøgnum løgtingsins fíggjarlóg. Fíggjarætlan grunsins verður tikin við á løgtingsins fíggjarlóg. (§ 2, 3. stk.)

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av.

**Ognarviðurskifti**

Vinnuframagrunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Fíggjarætlan grunsins verður tikin við á løgtingsins fíggjarlóg. (§ 2, 3. stk.)

**Tilknýti til landsroknskapin**

Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum. (§ 2, 2. stk.). Talan er um vanligan landsgrunn, ið ikki hevur fingið delegerað fíggjarheimild. Roknskapurin eigur tí at verða tikin við í játtanarroknskapin eins og aðrir landsgrunnar. Tað er sostatt ikki nøktandi, at fíggjarstøðan verður tikin við í landsroknskapin.

Roknskaparhaldið skal fylgja lógini um landsins almenna roknskaparhald v.m. (§ 6) Henda áseting er óneyðug, tí hetta er galdandi sambært Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1,

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum.

**Grannskoðanarviðurskifti**

Roknskapirnir verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara. (§ 6). Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing um virksemið í farna árinum. (§ 6, stk. 2).

Talan er um ein landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

**Fylgiskjal 26**

**Jarðargrunnurin**

**Navn**

Færøernes Jordfond. (Jarðargrunnurin)

**Endamál**

Endamálið er, at: "Fremme af jordbrug, Havebrug m.v." (§ 8)

**Stovnan**

Grunnurin varð stovnaður við fólkatingslóg nr. 174 frá 24. mai 1937 for Færøerne om jordbrugets fremme, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 160 frá 19. desember 1997.

Grunnurin varð yvirtikin sum føroyskt sermál við kunngerð nr. 37 frá 26. august 1956 um yvirtøku av Jarðargrunninum og kongsjørðini.

Jarðargrunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Fólkatingslóg nr. 174 frá 24. mai 1937, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 160 frá 19. desember 1997.

Bekendtgørelse nr. 120 af 22. marts 1938: Reglement for landbrugsraadet, nedsat i henhold til lov for Færøerne nr. 174 af 24. maj 1937 om jordbrugets fremme, sum broytt við kunngerð nr. 164 frá 26. august 1993.

Kunngerð nr. 37 frá 26. august 1956 um yvirtøku av Jarðargrunninum og kongsjørðini.

**Leiðsla**

Jarðargrunnurin verður fyrisitin av jarðarráðnum eftur reglum, sum verða gjørdar av landsstýrinum. (§ 9)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Jarðargrunnurin verður fyrisitin av jarðarráðnum eftur reglum, sum verða gjørdar av landsstýrinum. (§ 9 í fólkatingslóg nr. 174 frá 24. mai 1937, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 160 frá 19. desembur 1997.)

Í jarðarráðnum eru 5 limir, sum verða valdir av landsstýrinum. (§ 3 í lóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 23 apríl 1999).

Landstýrið ger reglur fyri lánum, sum verða givin úr grunninum (§ 40 í fólkatingslóg nr. 174 frá 24. mai 1937, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 160 frá 19. desember 1997).

Lán yvir 70.000 kr. kunna ikki verða givin, uttan landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gevur loyvi. (§ 41 í fólkatingslóg nr. 174 frá 24. mai 1937, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 160 frá 19. desembur 1997).

Reglur um útlánsrentu og afturgjalding av lánum úr grunninum verða ásettar av jarðarránum eftir góðkenning frá landsstýrinum. (§ 49 í fólkatingslóg nr. 174 frá 24. mai 1937, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 160 frá 19. desembur 1997).

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

Løgtingið kann broyta virksemið hjá grunninum. Avtøka av grunninum kann tó ikki fara fram uttan eftir semju millum landsstýrið og ríkisstýrið. (Kunngerð nr. 37 frá 26. august 1956 um yvirtøku av Jarðargrunninum og kongsjørðini.)

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar.

Talan er um vanligan landsgrunn, ið ikki hevur fingið delegerað fíggjarheimild. Roknskapurin eigur tí at verða tikin við í játtanarroknskapin, eins og aðrir landsgrunnar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Grunnurin er landsgrunnur, settur á stovn av donsku stjórnini og yvirtikin av føroyska heimastýrinum. Virksemið kann broytast við løgtingslóg.

Talan er um føroyskt sermál, har grunnurin tó ikki kann takast av uttan við semju millum landsstýrið og donsku sjórnina. (Kunngerð nr. 37 frá 26. august 1956 um yvirtøku av Jarðargrunninum og kongsjørðini.)

**Ognarviðurskifti**

Jarðargrunnurin er landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans.

### Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Grunnurin verður ikki tikin við í fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg.

### Tilknýti til landsroknskapin

Roknskapurin hjá grunninum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Jarðargrunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Jarðargrunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Jarðargrunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

### Grannskoðanarviðurskifti

Grunnurin verður grannskoðaður av tveimum grannskoðarum. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum velur tann eina og løgtingið tann eina. (§ 14 í Bekendtgørelse nr. 120 af 22. marts 1938)

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

## Fylgiskjal 27

## Grunnur fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu

### Navn

Grunnur fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu.

### Endamál

Grunnurin hevur til endamáls at veita lán og studning til vakstrarhús og uttandura

grønmetisframleiðslu. (§ 1)

**Stovnan**

Grunnurin varð stovnaður við løgtingslóg nr. 134 frá 20. august 1997.

Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Løgtingslóg nr. 134 frá 20. august 1997 um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu, sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 19. desember 1997.

Kunngerð nr. 37 frá 30 mars 1998 um grunn fyri vakstrarhús og grønnmetisframleiðslu.

**Leiðsla**

Grunnurin verður fyrisitin av einum av landsstýrismanninum tilnevndum stýri við 3 limum og 3 tiltakslimum. Stýrið verður valt fyri 4 ár. (§ 3 í Ll. 134/1997).

Dagliga virksemið verður fyrisitið av Føroya Ídnaðargrunni (§ 1, stk. 1, í kunngerð 37/1998). Føroya Ídnaðargrunnur varð avtikin við lóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Allarhelst verður grunnurin framyvir fyrisitin av Vinnuframagrunninum.

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Grunnurin er undir eftirliti landsstýrismansins. (§ 2 í Ll. 134/1997).

Landsstyrismaðurin tilnevnir stýrið fyri grunnin. (§ 3 í Ll. 134/1997).

Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um umsiting grunnsins (§ 3, stk. 2 í Ll. 134/1997).

Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur og treytir fyri láni- og stuðulsveitingum (§ 5, stk. 3 í Ll. 134/1997).

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til góðkenningar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

### Broyting av virksemi/avtøka av grunni

Løgtingið kann broyta virksemi grunsins, herundir taka grunnin av.

### Ognarviðurskifti

Grunnurin er ein landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans

### Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg

### Tilknýti til landsroknskapin

Roknskapurin hjá grunninum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur lógin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

### Grannskoðanarviðurskifti

Roknskapirnir verða grannskoðaðir av løggildigum grannskoðara. Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum frá stýrinum. (§ 6 í Ll. 134/1997).

Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum

saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

---

**Fylgiskjal 28**

**Jólamerkjagrunnurin**

**Navn**

Jólamerkjagrunnurin.

**Endamál**

Jólamerkjagrunnurin hevur til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, sum Postverk Føroya gevur út. (§ 1)

Ágóðin verður býttur út sum studningur til ávís tiltøk til frama fyri børn, til stovnar, feløg o.tl., ið virka fyri hesum tiltøkum. (§ 1, stk. 2)

Hóast høvuðsendamálið sambært § 1 stk. 2 kann stýrið, um allir limir eru samdir, og tá serligur tørvur er ella í serligum føri, lata studning til annað enn ávís tiltøk, til rakstur í stytri áramál, til tiltøk til frama fyri ungdóm ella brekað fólk ella onnur samfelagsgagnlig endamál. Í ávísum serstakum føri kann stuðulin verða latin sum lán. (§ 1, stk. 3).

**Stovnan**

Grunnurin varð stovnaður við kunngerð nr. 92 frá 5. desember 1979.

Grunnurin er ein landsgrunnur.

**Lóggáva**

Kunngerð nr. 92 frá 5. desember 1979 Reglugerð fyri Jólamerkjagrunnin

**Leiðsla**

Eitt trímannastýri hevur um hendur leiðslu grunsins. Stýrið er samansett soleiðis:

- Ein av skrivstovustjórunum á landsskrivstovuni
- Almannastjórin
- Postverksstjórin (§ 2)

**Ávirkan hjá landsstýrinum**

Landsstýrið hevur gjørt reglugerðina og kann broyta hana, eftir at ummæli er fingið frá stýrinum. (§

6). Landsstýrið er tó ikki bundið av ummælinum.

**Ávirkan hjá løgtinginum**

Løgtingið hevur ávirkan gjøgnum lóggávuvald sítt.

**Eftirlit hjá løgtinginum**

Roknskapurin fyri grunnin verður ikki lagdur fyri løgtingið til góðkenningar.

Tá talan er um landsgrunn við sjálvstøðugum roknskapi, skal landsstýrismaðurin leggja roknskapin fyri løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin skal harumframt lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, og leggja hann saman við viðmerkingum sínum fyri løgtingið til samtyktar, sí § 45, stk. 2-4 í stýrisskipanarlógini.

**Broyting av virksemi/avtøka av grunni**

Landsstýrið kann broyta virksemið hjá grunninum herundir taka grunnin av. (§ 6). Landsstýrið kann tó ikki taka avgerð um ognirnar uttan fyrst at spyrja løgtingið eftir, sí stýrisskipanarlógin § 43, 2. stk.

**Ognarviðurskifti**

Grunnurin er ein landsgrunnur og er sostatt ogn landskassans

**Tilknýti til fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg**

Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlóg ella játtanarlóg. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur kunngerðin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið hjá grunninum skal haldast uttan fyri fíggjarlóg

**Tilknýti til landsroknskapin**

Roknskapurin hjá grunninum verður ikki tikin við í landsroknskapin. Eingin lógarheimild er fyri hesum. Antin eigur virksemið at verða tikið við í landsroknskapin, ella eigur kunngerðin at verða broytt, soleiðis at hon ásetir, at virksemið skal haldast sundurskilt frá landsroknskapinum. Talan er tó um ogn hjá landinum, og tískil eigur ognin at verða tikin við í landsroknskapin.

Grunnurin kemur undir Ll. 33/1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir kunngerð 114/1996 um roknskaparverk landsins o.a., § 2, stk. 1.

Grunnurin kemur undir rundskriv um vegleiðing um roknskaparreglugerð frá Fíggjarmálastýrinum frá august 2001.

**Grannskoðanarviðurskifti**
Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara, sum stýrið tilnevnir. Roknskapurin verður saman við viðmerkingum frá grannskoðaranum sendur landsstýrinum til góðkenningar. (§ 5, stk. 2-3)
Talan er um ein landsgrunn, har roknskapurin ikki er við í landsroknskapinum. Tað merkir, at landsstýrismaðurin letur løgtingsgrannskoðarunum roknskapin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, sí § 11, stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum roknskapin, sí § 4, nr. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja løgtingsgrannskoðararnir fyri løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av roknskapinum saman við viðmerkingum sínum, § 19, stk. 1, sí § 19 stk. 2 í Ll. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.